# BÚSKAPARRÁÐIÐ

BÚSKAPARFRÁGREIÐING 2008

# Búskaparráðið

*Gunn Danielsen, cand. polit.*

*Jørn Astrup Hansen, cand. oecon*

*Rúna Hjelm, fiskivinnufrøðingur*

*Kaj Johannessen, cand. merc.*

*Zvonko Mrdalo, M. Sc. in Economics*

*Elisabeth Eldevig Olsen, fiskivinnufrøðingur*

*Durita Tausen, cand. scient. oecon.*

**Skrivari**

*Róar Akralíð, stud. polit.*

Frágreiðingin verður latin sambært § 3 í løgtingslóg nr. 120 um Búskaparráð

.

Tórshavn, desembur 2008

Jørn Astrup Hansen

Formaður

Gunn Danielsen

Kaj Johannesen

/Róar Akralíð

skrivari

**Innihaldsyvirlit**

**Innihaldsyvirlit**........s. 4
**1. Samandráttur**........s. 6
**2. Búskaparstøðan**........s. 9
2.1. Búskaparvøkstur........s. 9
2.2. Støðan í høvuðsgeirunum........s. 11
2.3. Húsarhaldini........s. 11
2.4. Fyritøkurnar........s. 15
2.4.1. Fiskaútflutningur........s. 15
2.4.2. Byggivinna........s. 16
2.4.3. Peningastovnar........s. 17
2.5. Tað almenna........s. 21
2.5.1. Landið........s. 21
2.5.2. Kommunurnar........s. 22
2.5.3. Sosialu grunnarnir........s. 23
2.6. Umheimurin........s. 24
2.7. Prísirnir lækka........s. 26
**3. Fiskivinnan á sjónum**........s. 27
3.1. Viðkvæmisgreining av skipsbólkunum........s. 29
3.1.1. Bakkast vegna oljuprís........s. 29
3.2. Niðurstøða frá viðkvæmisgreiningini........s. 30
3.3. Politiskt ásett veiðubýti........s. 31
3.4. Hví politiskt ásett veiðubýti?........s. 31
3.5. Tilmælið hjá Búskaparráðnum........s. 32
**4. Tað almenna**........s. 32
4.1. Er tað almenna í Føroyum stórt?........s. 35
4.2. Hvussu verður tað almenna fíggjað?........s. 37
4.3. Kann fíggingin verða frægari?........s. 39
4.4. Bústaðarskattur........s. 41
4.5. Hvussu verður bústaðurin skattaður........s. 44
4.5.1. Meting av bústaðarvirðinum........s. 45
4.5.2. Peningatrotstrupulleikar........s. 46
4.6. Hvør er inntøkan av bústaðarskatti?........s. 46

4.7. Niðurstøða........................................................................................s. 47

**5. Bókmentaskrá**........................................................................................s. 49

**6. Fylgiskjal**........................................................................................s. 52

6.1. Fylgiskjal 1……........................................................................................s. 52

**1. Samandráttur**

Føroyski búskapurin stendur frammanfyri stórum avbjóðingum.

Avleiðingarnar frá fíggjarkreppuni, sum rakt hevur stórar partar av heiminum, kennast eisini í Føroyum. Amerikanski Tjóðbankin, Federal Reserve, lækkaði rentuna sera nógv aftaná tann 11. septembur 2001, og pengamongdin vaks. Frá Amerika, sum hevði ógvuliga stór hall á fíggjarlógini og eisini á gjaldsjavnanum, floymdi síðani peningurin um allan heim.

Við tí støðu, sum amerikanski dollarin hevur fram um onnur gjaldoyru, gjørdist tann ríkiliga penganøgdin eitt alheimsfyribrigdi. Vit fingu metlágar rentur – eisini í Føroyum og Danmark. Útlánini hjá peningastovnunum vuksu munandi meira enn veruligi búskapurin. Nýggir roknskaparhættir við væl veikari krøvum til burturleggingar gjørdu eisini sítt til, at útlánini vuksu. Í Danmark, og í Føroyum, byrjaði hetta av álvara í 2005.

Peningastovnarnir fíggjaðu áður síni útlán við innlánum, men útlánini fingu nú sítt egna lív, við tað at peningastovnarnir fóru at læna pening í útlandinum fyri at fíggja tey. Soleiðis vuksu útlánini meira enn innlánini, og tey vuksu eisini meira, sum áður nevnt, enn tann veruliga framleiðslan í búskapinum. Hendan gongd elvdi til bløðrur, serstakliga á bústaðarmarknaðinum og partabrævamarknaðinum. Bløðrurnar eru nú brostnar, og lántakarar og peningastovnar hava mist stór virði.

Útlánsvirksemið hjá peningastovnunum hevur stimbrað búskapin síðani 2005, og hetta virksemi hevur verið konjunkturviðgangandi. Í ávísan mun hava peningastovnarnir sjálvir skapað uppgongdina. Nú er støðan ein onnur. Minni útlánsvirksemi hevur tálmandi ávirkan á búskapin, og peningastovnarnar fara harvið – vegna vantandi likviditet og tap á útlánum – at skunda undir búskaparligu afturgongdina.

Tað eru tó ikki bara peningastovnarnir, ið hava virkað við til, at vit hava fingið stór búskaparsveiggj. Landsstýrið hevur eisini styrkt um búskaparsveiggini við óhóskandi skattapolitikki. Har var eingin orsøk hjá undanfarnu samgongu (ABC) at veita skattalættar seinastu árini. Teir vóru konjunkturviðgangandi og elvdu harvið til enn heitari búskap.

Nú er vend komin í búskapargongdina, so búskaparstøðan er nú ein onnur. Skattagrundarlagið er minkandi, og haraftrat er nýtslan minni. Minni nýtsla merkir færri inntøkur frá avgjøldum, eitt nú MVG. Útreiðslurnar hjá landskassanum fara kortini at vaksa, og harvið verður eitt stórt undirskot á fíggjarlógini fyri 2009. Sannlíkt er, at afturgongdin hevði verið minni, um undanfarna landsstýri ikki hevði stimbrað búskapin óneyðuga nógv við skattalættunum.

Núverandi landsstýri stendur sostatt framman fyri einari tvístøðu. Tað má antin skerja útreiðslurnar ella økja skattainntøkurnar, um javnvág skal verða í landsrakstrinum. Báðir kostirnir styrkja tó um afturgongdina, og eru tískil ivasamir. Landsstýrið kann eisini gera av at halda fast og ríða stormin av sær. Kortini kann verða neyðugt við tiltøkum, um afturgongdin stendur leingi við.

Við einum undirskoti uppá 570 mió. kr. í 2009 má landsstýrið allarhelst økja um skattainntøkurnar í framtíðini, og landsstýrið eigur tá heldur at umhugsa aðrar gongdar leiðir enn øktan arbeiðsinntøkuskatt, tí avleiðingin kann verða minni útboð av arbeiðsmegi.

Bústaðarskattur er ein møguleiki, um landsstýrið vil sleppa undan at hækka arbeiðsinntøkuskattin. Spurningurin um bústaðarskatt er politiskur (ideologiskur), men Búskaparráðið vísir á, at skipanin við rentustuðli ikki er haldgóð, verður bústaðarskattur ikki settur í verk. Um bústaðarskattur ikki er ein gongd leið, eigur rentustuðulin sostatt at avtakast.

Búskaparráðið hevur fyrr víst á, at landsstýrið eigur at avtaka rentustuðulin. Rentustuðulin hevur, saman við lágu rentuni seinastu árini, elvt til ov stórt byggivirksemi í Føroyum. Fíggjarliga áeggjanin (insitamentið) at byggja egnan bústað hevur verið ov stór við tí lágu rentuni. Føroyar kunnu vera í vanda at hava eina sokallaða bústaðarbløðru.

Haraftrat vísir Búskaparráðið á, at rentustuðulin saman við vantandi bústaðarskatti ger leiguíbúðabygging lítið lokkandi. Heldur enn at umhugsa leiguíbúðabygging við landskassastuðli, átti landsstýrið at javntsett eigara- og leigarabústaðin í skattahøpi.

Fyritøkurnar í fíggjarliga geiranum hava trýst búskapin so mikið nógv fram, at framleiðandi vinnurnar nærum hava verið gloymdar.

Fiskiskapurin hevur verið hart raktur av høgum oljuprísum og vánaligum fiskiskapi í 2008. Virkisbúskaparliga er ikki stórt høpi í at líta at vinnuni undir einum, tí ymiskt er, hvussu meint skipabólkarnir eru raktir. Raksturin er ikki eins hjá øllum skipabólkum; eitt nú er ymiskt, hvussu broytingar í oljuprísinum ávirka teir.

Viðkvæmisgreining vísir, at lemmatrolarnir verða meint raktir, tá ið oljuprísurin økist, meðan væl frægari stendur til hjá partrolarunum. Hetta bendir á, at lógin um vinnuligan fiskiskap eigur – við fyriliti til stovnsrøktina – at verða broytt soleiðis, at skipabólkarnir ikki eru fastlæstir. Samfelagsmissurin við fastlæsingini er stórur, og hetta var sjón fyri søgn fyrr í ár, tá ið stórur partur av lemmatrolaraflotanum lá við bryggju vegna høga oljuprísin, tí hann slapp ikki at partrola. Spurnartekin má eisini setast við skynsemið í fiskidagaskipanini, tí hon hevur ikki í nóg stóran mun verið før fyri at lækka veiðutrýstið.

Tá ið hugt verður at fiskiflotanum undir einum – sum samfelagsbúskaparliga gevur meining – kunnu tølini meiri enn so loypa ekka á ein. Bruttoinntøkan var millum 1,1 og 1,2 milliardir krónur í 2006-07. Hetta er sama støði sum í 2002. Men frá 2002 til 2007 er langfreistaða skuldin hækkað við 86 prosentum – frá 953 mió. kr. til 1.775 mió. kr..

Fiskiflotin hevur síðani 2002 havt eitt ársúrslit uppá 448 mió. kr.. Í sama tíðarskeiði hava eigararnir tikið 565 mió. kr. út í vinningsbýti, soleiðis at eginkapitalurin er minkaður úr 914 mió. kr. niður í 784 mió. kr.. Eginpeningurin, sum fyri fimm árum síðani fíggjaði 34 prosent av aktivunum, fíggjaði í 2007 bert 20 prosent. Eitt so lágt støði er vandamikið í eini vinnugrein, sum til eina og hvørja tíð kann verða fyri hørðum bakkasti.

Enn meiri ørkymlandi er at hyggja at hvussu eginkapitalurin er samansettur. Í 2002 vóru 10 prosent av eginkapitalinum uppskrivingar, meðan ikki minni enn 46 prosent av eginkapitalinum vóru uppskrivingar í 2007. Serstakliga í 2006-07 eru stórar upphæddir bókaðar sum "goodwill". "Goodwill" er fyrst og fremst tað virði, ið fiskiloyvið hevur. Í 2002 var "goodwill" 26 mió. kr., meðan 335 mió. kr. vórðu bókaðar sum "goodwill" í 2007. Allarhelst vísir hendan gongdin, at tað hevur borið rættiliga væl til at fingið lán.

Gjaldførið í vinnuni er ikki gott. Í 2003 hevði hon eitt gjaldføri uppá 100 mió. kr., meðan hon í 2007 manglaði 400 mió. kr. í gjaldføri. Tað vísir seg at vera stórur munur á reiðaríum og skipum, men undir einum siglir fiskiflotin búskaparligan vandasjógv, og gongdin í 2008 hevur gjørt støðuna uppaftur verri.

Hendan frágreiðingin er síðsta frágreiðing hjá hesum Búskaparráðnum. Ráðið vil nýta høvið, eins og fyrrverandi Búskaparráð, at vísa á, at tað er neyðugt at styrkja Ráðið. Hetta er alneyðugt, um Búskaparráðið skal liva upp til sínar egnu ambitiónir og tær væntingar, ið politikarar og almenningurin hava.

Búskaparráðið hevur ov lítið av peningi, væntar hagtøl og manglar skrivarastovu. Um ikki virki ráðsins verður raðfest væl hægri, er neyvan nøkur orsøk at tilnevna eitt nýtt ráð.

## 2. Búskaparstøðan

Hagtalsstøðan í Føroyum er ikki batnað seinasta árið, tí verður tað endurtikið í hesari frágreiðing, at tað er umráðandi at hava góð og tíðarhóskandi hagtøl, tí uttan hagtøl verða metingarnar um búskaparstøðuna ikki nóg góðar, og tilmæli kunnu ikki gevast út frá bestu fyritreytum. Tíverri er støðan enn soleiðis, at føroyingar hava ov fá hagtøl. Tað er brúk fyri væl fleiri og betri hagtølum, um hagtalsstøðið skal lúka tað krav, at øll tey mest átroðkandi búskaparligu hagtølini verða framleidd. Hetta er galdandi, um vit hugsa um at nøkta okkara egna tørv, men eisini um vit ætla okkum upp í EFTA ella ES og kanska gerast fullgóður limur í OECD. Felagsskapir krevja jú vitan um limalondini. Tað er tí sera týdningarmikið at bøta um hagtalsarbeiðið í Føroyum, so vitanin um land okkara tekur støði í veruliga vitan og ikki gitingum og fordómum, og at vit haraftrat kunnu verða samanborin við onnur lond.

### 2.1. Búskaparvøkstur

Eingi tøl eru, sum beinleiðis kunnu nýtast at rokna tann veruliga vøksturin í samlaðu føroysku búskaparframleiðsluni ella við øðrum orðum vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ) í føstum prísum. BTÚ í føstum prísum hava vit ikki, og tað seinasta talið fyri BTÚ í leypandi prísum er frá 2006, og tað kann heldur ikki brúkast at rokna tann veruliga framleiðsluvøksturin, tí príshækkingar verða ikki tiknar úr tølum í leypandi prísum. Sostatt eru frægastu hagtølini fyri búskaparvøksturin vøksturin í lønargjaldingunum. Hetta, tí tøl fyri lønargjaldingarnar verða framleidd regluliga, og

lønargjaldingarnar hava verið ein rímiliga fastur partur (umleið tveir triðingar) av bruttofaktor-inntøkuni, sum er bruttotjóðarúrtøkan uttan framleiðsluskattir og framleiðslustudning. Lønar-gjaldingarnar eru tó í leypandi prísum, men lønargjaldingarnir kunnu rættast við brúkaraprístalinum fyri at fáa mát fyri veruliga vøksturin í lønargjaldingunum. Viðmerkjast skal, at hetta er ikki lýtaleyst, tí lønarvøksturin fylgir ikki altíð brúkaraprístalinum.

Í talvu 1 sæst vøksturin í samlaðu lønargjaldingunum, og hvussu tær ymisku vinnurnar hava ávirkað vøksturin. Har tað eitt nú stendur, at samlaðu lønargjaldingarnar í 2001 vuksu við 11,4 prosentum, og *Fiskiskapur* var 3,0 prosentstig, verður meint við, at *Fiskiskapur* stóð fyri 3,0 prosentstigum av samlaða vøkstrinum á 11,4 prosentum. Talvan vísir, at í kjalarvørrinum á tí stóra vøkstrinum beint eftir aldarskiftið, var vøksturin í lønargjaldingunum frá 2003-2005 lítil og eingin. Tað var serliga *Fiskiskapur* sum trekti niður í tíðarskeiðnum, meðan *Almenn fyrisiting og tænastur* hækkaðu tað samlaða talið. Sum hóskandi er í einum tíðarbili við afturgongd í tí privatu vinnuna, heldur tað almenna sínar lønarútreiðslur og minkar um niðurgongdina. Niðurgongdin vendi í 2006. Sostatt var samlaði vøksturin í lønargjaldingunum yvir 5 prosent í 2006, meðan vøksturin var gott 4 prosent í 2007. Tað var serliga *Aðrar vinnur*, sum hækkaðu støðið í 2007. Búskapurin hevur allarhelst vent aftur í 2008, tí lønargjaldingarnar eru falnar við 3,5 prosentum.

**Talva 1. Vøkstur í samlaðum lønargjaldingum í "føstum prísum" og vakstrarpartar**

| **prosentstig** | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | **2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Fiskiskapur* | 3,0 | 1,6 | -2,6 | -1,8 | 0,8 | 1,6 | -0,3 | -3,8 |
| *Fiskavøruídnaður* | 0,5 | 1,0 | -0,1 | -0,3 | -0,4 | -0,4 | -0,4 | -0,6 |
| *Bygging* | 0,8 | 1,0 | 0,0 | 0,6 | -0,2 | 0,9 | 0,6 | 0,1 |
| *Handil og umvæl.* | 1,0 | 1,5 | 0,2 | 0,1 | -0,4 | 0,5 | 0,6 | -0,1 |
| *Fígg. og trygging* | 0,1 | 0,3 | 0,0 | 0,2 | 0,1 | 0,6 | 0,7 | 0,1 |
| *Almenn fyr. og tæ.* | 2,5 | 3,7 | 1,4 | 2,6 | 0,8 | 0,3 | 0,9 | 0,2 |
| *Aðrar vinnur* | 3,5 | 2,9 | 0,7 | -0,7 | -0,2 | 2,1 | 2,2 | 0,6 |
| ***Tilsamans**** | **11,4** | **12,0** | **-0,4** | **0,7** | **0,4** | **5,7** | **4,3** | **-3,5** |

kelda: Hagstova Føroya
* *Tilsamans* er í prosentum
** vøkstur frá jan.-aug. í 2007 til 2008

Orsøkin er, at lønargjaldingarnar eru minkaðar nógv í *Fiskapur*, meðan lønargjaldingarvøksturin innanfyri *Bygging*, *Handil og umvæling*, *Fígging og trygging* og *Aðrar vinnur* er hæsaður av.

Tá ið hugt verður eftir prosentbroytingum sæst, at *Fiskiskapur* væntandi fellir við 27 prosentum í 2008, meðan *Fiskavøruídnaður* minkar 12 prosent.

**Talva 2. Vøkstur í samlaðum lønargjaldingum í "føstum prísum" og vakstrarpartar**

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | *2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Fiskiskapur* | 18% | 9% | -14% | -12% | 6% | 12% | -2% | -27% |
| *Fiskavøruídnaður* | 7% | 14% | -2% | -4% | -6% | -6% | -7% | -12% |
| *Bygging* | 15% | 17% | -1% | 10% | -3% | 14% | 9% | 2% |
| *Handil og umvæling* | 10% | 16% | 2% | 1% | -4% | 6% | 6% | -1% |
| *Fígging og trygging* | 3% | 8% | 0% | 5% | 1% | 15% | 15% | 2% |
| *Almenn fyr. og tæ.* | 8% | 12% | 5% | 8% | 2% | 1% | 3% | 1% |
| *Aðrar vinnur* | 14% | 11% | 3% | -3% | -1% | 8% | 8% | 2% |
| ***Tilsamans*** | **11%** | **12%** | **0%** | **1%** | **0%** | **6%** | **4%** | **-4%** |

kelda: Hagstova Føroya
* vøkstur frá jan.-aug. í 2007 til 2008

## 2.2. Støðan í høvuðsgeirunum

Tá ið eitt samlað yvirlit skal fáast av búskaparstøðuni, verður hugt at støðuni í høvuðsgeirunum. Høvuðsgeirarnir eru húsarhaldini, tað almenna, fyritøkurnar og umheimurin[1].

## 2.3. Húsarhaldini

Flest føroysk húsarhald eru viðskiftafólk í føroysku peningastovnunum, og tí eru tøl frá hesum stovnum umboðandi fyri lánigongdina hjá føroysku húsarhaldunum. Tølini vísa, at lántøkan hjá húsarhaldunum frá føroyskum peningastovnum er minkað heilt nógv í mun til undanfarin ár[2].

Tøl vísa, at lántøkan hjá húsarhaldunum frá føroyskum peningastovnum øktist við 520 milliónum krónum frá juni 2007 til juni 2008[3]. Ein vøkstur uppá 6 prosent. Hetta er nøkunlunda tað støðið, sum útlánsvøksturin til húsarhald lá á, áðrenn skáalánini vórðu innførd á heysti 2005. Sostatt kann sigast, at lántøkan er vend aftur til eina meira vanliga legu.

[1] Feløg sum ikki reka vinnu eru eisini ein høvuðsgeiri, men verða ikki viðgjørd í hesi frágreiðing.
[2] Tølini frá Landsbanka Føroya eru fyri "húsarhald og felagsskapir", men her verður bara skrivað "húsarhald".
[3] kelda: Landsbanki Føroya

**Mynd 1. Útlánsvøkstur til húsarhald**




kelda: Landsbanki Føroya

Støðan á sethúsamarknaðinum ávirkar tey húsarhald, sum búgva í sethúsum og tey húsarhald, sum ætla at útvega sær eini sethús. Tá ið prísurin lækkar á sethúsum, verða tey sum eiga eini sethús fátækari, meðan tað verður ódýrari hjá teimum, sum skulu útvega sær eini hús. Tøl fyri sethúsamarknaðin vísa, at miðalprísurin í øllum landinum er fallin seinasta árið – frá øðrum ársfjórðingi í 2007 til annan ársfjórðing í 2008[4].

Miðalprísurin í høvuðsstaðarøkinum er fallin við 2 prosentum. Í størri og smærri bygdum er hann eisini minkaður - í størri bygdum við 18 prosentum og í smærri bygdum við 2 prosentum[5]. Nevnast skal tó, at uppgerðin hjá Eik byggir ikki á so øgilig nógv sethús, so tað kann hugsast, at óvanlig sethús, ið eru vorðin seld, kunnu hava havt avgerandi ávirkan á miðalprísin. Tó má staðfestast, at uppgongdin í sethúsaprísum er steðgað upp. Á myndini sæst miðalprísurin fyri allar Føroyar undir einum.

[4] Tølini fyri sethúsamarknaðin eru frá Eik Banka
[5] Høvuðsstaðarøkið er Tórshavn, Argir og Hoyvík. Størri bygdir eru Vestmanna, Froðba, Fuglafjørður, Glyvrar, Klaksvík, Kollafjørður, Miðvágur, Runavík, Saltangará, Signabøur, Trongisvágur, Tvøroyri, Vágur, Øravík, Gøtugjógv, Norðagøta, Syðrugøta. Smærri bygdir er restin.

**Mynd 2. Sethúsaprísur í Føroyum**




kelda: Eik Banki

Orsøkin til hesa gongd kann vera, at rentan á sethúsalánum er farin upp, tað økir um kostnaðin hjá teimum, sum hava ætlan um at taka sethúsalán[6]. Alheimsfíggjarkreppan hevur eisini elvt til, at tað er verri hjá føroysku peningastovnunum at fáa pening til vega at arbeiða við; tað hevur við sær, at tað er ikki eins lætt, sum tað hevur verið seinastu árini, hjá fólki at fáa lán til húsakeyp. Útboðið av íbúðum í høvuðsstaðarøkinum er harumframt vaksið síðstu tíðina, og tað kann hava trýst prísin niðureftir.

Brúkaraprístalið, sum er eitt útroknað tal fyri nýtsluna hjá húsarhaldunum, vísir hvussu prísirnir á nýtsluni broytast. Húsarhaldini nýta ikki eins nógvan pening til teir ymisku nýtslubólkarnar. Tá ið vektirnar til brúkaraprístalið vórðu útroknaðar í 1998, fingu teir nýtslubólkar, ið kostaðu nógv í nýtslu, eina hægri vekt í útrokningini. Hesar vektir frá 1998 verða enn brúktar. Í øðrum londum verða vektirnar vanliga endurmettar í minsta lagi fimta hvørt ár, tí nýtslan hjá húsarhaldunum broytist við árunum. Til dømis eru samskiftisútreiðslurnar hjá húsarhaldunum helst øktar munandi, hóast prísurin á samskifti er vorðin minni. Á myndini sæst, at brúkaraprístalið er vaksið meira í ár enn tey undanfarnu árini. 6,9 prosent er brúkaraprístalið vaksið í ár. Orsøkin er fyrst og fremst, at

[6] kelda: Eik Banki

prísurin á býli er vorðin størri, har serliga rentan á sethúsalánum og prísurin á brenniolju eru hækkað. Prísurin á mati og drekka er eisini hækkaður nógv.

**Mynd 3. Árligur prosentvøkstur í brúkaraprístalinum**




kelda: Hagstova Føroya
* prosentvøksturin í 2008 tekur støðið í trimum ársfjórðingum

At tað er hækkan í prísinum á býli, mati og drekka rakar húsarhaldini serstakliga meint. Orsøkin er, at hetta er nýtsla, sum er torfør at broyta. Sjálvsagt kann ein brúka nakað minni av brenniolju heima við hús, og tann minni dýri osturin kann keypast hjá keypmanninum, men tær stóru broytingarnar fær ein illa gjørt, tí hetta eru neyðturviligar vørur.

Tað merkir, at keypsmegin hjá húsarhøldunum fellur nógv, og eftirspurningurin eftir øllum vørum og tænastum minkar í samfelagnum. Haraftrat sær tað út til, at lønin á arbeiðsmarknaðinum ikki fylgir við prísvøkstrinum, tí tá ið hugt verður eftir einum vanligum arbeiðsmanni við trý ára starvsaldri sæst, at lønin er bert hækkað við 3,5 prosentum[7]. Hetta er gott 3 prosentstig minni enn prísvøksturin.

[7] kelda: Samtak

2.4. Fyritøkurnar

Fyritøkurnar kunnu verða býttar upp í útflutningsvinnur og heimamarknaðarvinnur. Einans nýggj tøl finnast fyri vøruútflutningin hjá føroyingum, og fiskaútflutningur fyllir umleið 95 prosent av samlaða vøruútflutninginum, so hjá útflutningsvinnunum verður bara hugt eftir útflutninginum av fiski. Á lønargjaldingarøkinum er byggivinnan og peningastovnarnir týdningarmiklar heimamarknaðarvinnur.

2.4.1. Fiskaútflutningur

Talva 3 vísir útflutningsvirðið á fiski. Meðan útflutningsvirðið vaks við gott 4 prosentum frá 2006 til 2007, so vísa fyribilstølini fyri 2008, at virðið á útflutninginum fer at minka frá 2007 til 2008.

Orsøkin er, at minni hevur verið fiskað av hýsu og upsa, meðan prísurin á toski og hýsu er minkaður. Toskanøgdin hevur hildið sær fyribils í ár, meðan upsaprísurin hevur staðið í stað. Haraftrat vísa fyribilstølini, at virðið av svartkjafti, sild og makreli verður minni í ár enn í 2007. Tað er svartkjafturin sum dregur niður, meðan virðið á sild og makreli ikki er stórvegis broytt. Tølini skulu tó takast við fyrivarni, tí allar landingar uttanlands í ár eru enn ikki skrásettar. Prísurin á havtasku er minkaður, og nøgdin er eisini fallandi.

Útflutningsnøgdirnar av laksi og sílum er væntandi størri í 2008, men prísurin er fallin vegna størri útboð á evropeiska marknaðinum. Føroya Havbúnaðarfelag metti í mei, at útflutningsvirðið fór at verða umleið 800 milliónir krónur í 2008, um marknaðarprísurin helt sær. Væntandi verða umleið 45.000 tons tikin í livandi vekt í 2008, sum er 15.000 tons meiri enn í 2007. Tey næstu árini verður roknað við, at tøkan fer at vaksa við umleið tíggju prosentum árliga.

Eingir nýggir sjúkratilburðir hava verið í alivinnuni, men enn verða innflutt rogn ikki kannað fyri sjúku. Føroya Havbúnaðarfelag metir, at rognini eru veikasta liðið í sjúkratilbúgvingini, tí meginparturin av teimum verða innflutt til Føroya, og trupulleikar eru við ymsum sjúkum í okkara grannalondum. Felagið hevur tískil kannað rognveitarar í Íslandi, Noregi og Skotlandi, og ein frágreiðing er fingið til vega, sum lýsir sjúkustøðuna á rognum í hesum londum.

**Talva 3. Virðið á fiskaútflutninginum**

| mió. kr. | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2007 jan.-sep. | 2008 jan.-sep. | +/ - % * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Toskur, hýsa og upsi* | 1.406 | 1.434 | 1.488 | 1.450 | 1.117 | 976 | -12,6 |
| *Svartkj., sild og makrel* | 222 | 345 | 363 | 501 | 341 | 70 | -79,6 |
| *Havtaska* | 96 | 135 | 156 | 127 | 104 | 49 | -52,6 |
| *Laksur og síl* | 762 | 499 | 473 | 589 | 395 | 674 | 70,6 |
| *Onnur fiskasløg* | 990 | 954 | 1.162 | 1.126 | 920 | 635 | -30,9 |
| ***Tilsamans*** | **3.477** | **3.367** | **3.642** | **3.793** | **2.877** | **2.404** | **-16,4** |

kelda: Hagstova Føroya
* broyting frá jan.-sep. í 2007 og 2008

## 2.4.2. Byggivinna

Tá ið prísurin verður nóg høgur á íbúðarmarknaðinum, loysir tað seg betur hjá húsarhaldinum at byggja nýtt og hjá byggiharrum at økja um útboðið á íbúðarmarknaðinum. Hetta sæst aftur í virkseminum hjá byggivinnuni, har talið av nýbyggingum er økt munandi seinnu árini. Í 1998 var talið av nýbyggingum til dømis einans 129, meðan 397 nýbyggingar vóru í 2007[8]. Suðurstreymoy

**Mynd 4. Innflutningur til byggivinnuna**




kelda: Hagstova Føroya
* Tølini eru fyri jan. til sep.

[8] kelda: Hagstova Føroya

átti gott 50 prosent av nýbyggingunum i 2007, meðan Norðoyggjar og Eysturoy áttu knapt 35 prosent. Tá ið metast skal um, hvussu gongdin verður í framtíðini, ber til at hyggja eftir inn-flutninginum til byggivinnuna. Mynd 4 vísir, at innflutningurin, tey seinnu árini, var størstur í 2007. Fyribils tøl fyri 2008 vísa, at innflutningurin til byggivirksemi fer at minka í ár. Hetta kann merkja, at eftirspurningurin frá húsarhøldunum er minkaður. Summi húsarhald hava tað jú peningaliga strævið, tí nýtsluprísirnir eru hækkaðir nógv seinastu tvey árini. Eisini er útboðið av bústøðum økt munandi seinnu árini, og tað elvir til, at eftirspurningurin eftir nýbygdum bústøðum minkar. Haraftrat er, sum nevnt, ikki lætt at fáa bústaðarlán frá peningastovnunum vegna peningatrot á peningamarknaðinum.

2.4.3. Peningastovnar

Í øllum heiminum eru peningastovnar raktir av einari herviligari fíggjarkreppu. Trupulleikarnir tóku veruliga dik á seg, tá ið summarið var við at halla. Fleiri stórir bankar máttu fáa nýggjan kapital, og aðrir lótu seg uppkeypa. Ofta var tað tað almenna, sum tók um endan. Teir stóru íløgubankarnir á Wall Street hava allir verið ígjøgnum stórar broytingar. Ein av teimum, Lehman Brothers, fór av knóranum tann 15. septembur 2008 – ein hending, sum útloysti eina veruliga kreppu í fíggjargeiranum.

Orsøkin til kreppuna er møguliga at finna afturi í 2001. Aftaná tann 11. septembur førdi tann amerikanski Tjóðbankin ein øgiliga stimbrandi pengapolitikk fyri at forða fyri einari búskaparligari afturgongd. Tjóðbankin oysti likviditet út á marknaðin, sum førdi til ta lægstu rentuna í yvir hundrað ár. Frá Sambandríkinum Amerika, sum hevði øgilig undirskot á fíggjarlógini og á leypandi postunum á gjaldsjavnanum, floymdi síðani hesin likviditetur kring allan heimin. Ein ørgrynna av likviditeti í heiminum varð sostatt veruleiki.

Vøksturin av likviditeti í Sambandsríkinum var størri enn vøksturin í veruliga búskapinum, og førdi hetta við sær eina bløðru í bústaðarmarknaðinum og virðisbrævamarknaðinum. Tey sokallaðu "sub prime"-lánini eru eitt dømi um hesa bløðru. Lánini vóru givin, við veð í bústøðunum, til fólk við sera vánaligum gjaldføri. Sostatt høvdu fólk mangan lánt allan peningin, sum varð settur í bústaðin. Peningastovnarnir vónaðu, at bústaðir hildu áfram at hækka í virðið. Bústaðarnir hækkaðu eisini í virði tey fyrstu árini, men hetta stóðst jú millum annað av, at peningastovnarnir av fyrstan tíð veittu

lán til fólk við ongum gjaldføri. Eitt satt pyramiduspæl sá sostatt dagsins ljós. Hetta mátti enda galið, og tað endaði galið.

Eftir at "sub prime"-lánini vóru latin til fólk, vórðu tey latin í annan ham, so at tey vórðu freistandi fyri keyparar um allan heim. Hetta varð gjørt við at leggja sera trygg lánsbrøv saman við "sub prime"-lánunum, so at váðin við "sub prime"-lánunum knappliga ikki longur hómaðist. Hetta gekk væl í fleiri ár, men tá ið rentan byrjaði av álvara at hækka í Sambandsríkinum, vórðu "sub prime"-lánini virðisleys, tí samstundis sum lántakarnir ikki høvdu ráð at rinda peningastovnunum lánið aftur, vóru bústaðarprísirnir falnir. Virðið á veðhøldunum hjá peningastovnunum var burtur. Útlándi peningurin var horvin. Peningastovnar, sum høvdu nógv av hesum lánum í skjáttuni, fóru av knóranum, og óttin millum peningastovnar breiddi seg um allan heim. Eingin peningastovnur visti, hvør var í vandi fyri at fara á húsagang, og tískil góvust peningastovnarnir at lána pening til hvønn annan. Tað kundi jú enda við, at teir ikki fingu peningin aftur. Peningamarknaðurin frysti. Serstakliga peningastovnar við stórum lánitørvi komu í trupulleikar av, at likviditeturin hvarv.

Kreppan kom eisini til Danmarkar, har Fólkatingið tann 10. oktober í 2008 mátti samtykkja eina lóg, sum skal syrgja fyri støðufesti í fíggjargeiranum í danska ríkinum. Fram til síðst í septembur 2010 eru allir innsetarar og lángevarar í peningastovnum í danska ríkinum tryggjaðir fullkomuliga ímóti tapi. Hetta er gjørt soleiðis, at peningastovnarnir sjálvir rinda minst 15 og hægst 35 milliardir í ein trygdargrunn. Peningurin í trygdargrunninum verður rindaður innsetarum og lángevarum í teimum peningastovnum, sum møguliga fara av knóranum. Um tað verður neyðugt við fleiri pengum, so veitir danski státurin óavmarkaða trygd. Peningastovnarnir velja sjálvir, um teir vilja vera við í trygdargrunninum, men tá ið innmeldingin er farin fram, kann ein ikki melda seg útaftur.

Allir týðandi danskir peningastovnar hava meldað seg til trygdargrunnin. Eisini teir føroysku peningastovnarnir hava valt at melda seg inn í grunnin, sum fer at kosta teimum (minst) 150 milliónir krónur. Tað verður væntað, at ein partur av upphæddini kann vinnast aftur við einari lægri rentu, tá ið peningastovnarnir skulu taka lán úti í heimi. Tó má sigast, at her er talan um rættiliga dýra trygd hjá peningastovnunum.

Síðani 2004 hava teir donsku peningastovnarnir havt vaksandi innlánsundirskot. Í oktober 2008 varð mett, at donsku peningastovnarnir skyldaðu 500 milliardir krónur til útlendskar

peningastovnar. Hendan gongd kom eitt sindur seinni til Føroya og byrjaði ikki av álvara fyrr enn í 2006 og 2007. Teir føroysku peningastovnarnir skyldaðu knapt 6 milliardir uttanlands eftir fyrsta hálvár í 2008.

Teir føroysku peningastovnarnir sita á umleið 0,8 prosent av marknaðinum í ríkinum, men teir sita á 1,2 prosent av tí samlaðu útlendsku lántøkuni. Føroysku peningastovnarnir hava sostatt, í mun til sína egnu støðd, lánt 2 milliardir meira í útlandinum.

Tá ið føroysku peningastovnarnir móttaka 100 krónur í innláni, lána teir 133 krónur út. Hetta svarar til støðið í Danmark. Hetta hevur víst seg at vera ógagnligt í Danmark og verður helst eisini ógagnligt í Føroyum. Ein skipan, sum er kjølfest á útlán av innlánum hjá øðrum peningastovnum, hevur jú víst seg at vera skirvislig. Í Íslandi koppaði eitt nú henda skipan í viku 41. Eitt heilt bankakervi fór í knús.

Likviditetskrøvini í peningastovnalógini hava víst seg ikki at megna at byrgja upp fyri útlánsvøksturin, tí teir lógarásettu likviditetsuppgerðirnar hava onga veruliga kunning. Við lógini hjá Fólkatinginum hava peningastovnarnir fingið tvey ára skotbrá at fáa javnvág í raksturin.

Likviditetstrotið á heimsmarknaðinum kundi allarhelst vorðið ein trupulleiki hjá føroyskum peningastovnum. Fráboðanin frá føroysku peningastovnunum um luttøku í trygdargrunninum merkir tó ikki við vissu, at teir høvdu ein likviditetstrupulleika. Peningastovnar hava jú mest sum ongan møguleika ikki at vera limir í grunninum, tí hetta hevði óivað havt ta avleiðing, at nógvir innsetarar høvdu tikið teirra pening út og sett hann í ein peningastovn sum luttók í trygdargrunninum, tí har er peningurin jú fullkomiliga tryggjaður.

Likviditeturin hjá peningastovnunum átti við hesum at verið tryggjaður. Tó fáa danskir peningastovnarnir allarhelst annað at hugsa um tey næstu árini. Bløðran á bústaðarmarknaðinum og virðisbrævamarknaðinum er brostin. Onkur skal bera tapið. Antin verður tað lántakarin – um hann kann klára tað – ella lángevarin. Í versta føri skattgjaldarin.

Vónandi verða teir føroysku peningastovnarnir ikki líka hart raktir, sum fleiri av teimum donsku peningastovnunum. Føroyskir lántakarar hava vanliga færri virðisbrøv enn danskir lántakarar, og har er neyvan eins stór bløðra á føroyska bústaðarmarknaðinum sum á tí danska.

**Talva 4. Samanbering av føroyskum og donskum peningastovnum**

| 1. hálvár 2008 | Føroyar | Danmark | Fø:Da , % |
|---|---|---|---|
| *Útlán, mia. kr.* | 18,2 | 2.272 | 0,80 |
| *Innlán, mia. kr.* | 13,7 | 1.726 | 0,79 |
| *Útlán/Innlán, pst.* | 133 | 132 | |
| *Lán frá útl. peningastovnum, mia. kr.* | 5,9 | 500 | 1,20 |
| *Inntøkur, mió. kr.* | 324 | 39.974 | 0,81 |
| *Útreiðslur, mió. kr.* | 322 | 28.838 | 1,12 |
| *Inntøka fyri hvørja útreiðslukrónu, kr.* | 1,01 | 1,39 | |
| *Akkumuleraðar niðurskrivingar, %** | 2,2 | 0,70 | |
| *Solvensur, %** | 14,6 | 14,3 | |

* tølini eru fyri alt samtakið

Tapini, sum allarhelst koma í kjalarvørrinum av fíggjarkreppuni, áttu teir føroysku peningastovnarnir tískil at klára. Føroysku peningastovnarnir hava niðursett teirra soliditet til danskt støði, men í tí føroyska solvensinum er ein størri partur eginkapitalur, og minni av blandingi millum eginkapital og fremmandakapital. Hetta er ein styrki. Føroysku peningastovnarnir hava eisini gjørt størri niðurskrivingar av útlánum enn danskir peningastovnar, hóast munurin hevur minkað tey seinastu árini. Niðurskrivingin er 2,2 prosent av samlaðu útlánunum í Føroyum, meðan hon einans er 0,7 prosent í Danmark.

Harafturímóti hava danskir peningastovnar ein meira effektivan rakstur. Hetta kann ljóða løgið, tí sjálvt um teir donsku peningastovnarnir hava størri viðskiftafólk - sum merkir lutfalsliga lægri kostnað – hava teir føroysku peningastovnarnir eina størri nýtslu av heildarfígging – lán, ið eru lutfalsliga ódýr at hava við at gera hjá peningastovnum.

Føroysku peningastovnarnir eiga 0,81 prosent av samlaðu inntøkunum hja peningastovnum í ríkinum. Hetta svarar til marknaðarpartin hjá teimum føroysku peningastovnunum. Tó hava føroysku peningastovnarnir lutfalsliga stórar útreiðslur, tí teir eiga 1,2 prosent av samlaðu útreiðslunum. Samanborið við donsku peningastovnarnar høvdu teir føroysku peningastovnarnar sostatt eina meirútreiðslu uppá 88 milliónir krónur fyrsta hálvár í 2008. Um einans verður hugt eftir inntøkum og útreiðslum, var effektiviteturin hjá føroysku peningastovnunum 73 prosent av effektivitetinum hjá teimum donsku peningastovnunum fyrru helvt av 2008.

## 2.5. Tað almenna

Teir føroysku almennu myndugleikarnir eru Landsstýrið, kommunurnar og sosialu grunnarnir Arbeiðsloysistryggingin (ALS), Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin (AMEG) og sjúkrakassarnir[9]. Tá ið mett verður um støðuna, mugu tí inntøkur og útreiðslur hjá øllum fimm myndugleikum verða eygleiddar. Ongin meining er jú í at siga nakað um støðuna í landinum uttan so, at allar tær almennu kontoirnar verða tiknar við.

### 2.5.1. Landið

Árini við stórum yvirskotum á fíggjarlógini eru farin aftur um bak í hesum umfari. Hetta tí tann dvínandi nýtsluvøksturin førir við sær, at inntøkuvøksturin frá meirvirðisgjaldinum (MVG) verður

**Talva 5. Roknskapur landskassans**

| mió. kr. | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008* | 2009* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Landsskattainntøkur* | 1.321 | 1.321 | 1.380 | 1.421 | 1.420 | |
| *Meirvirðisgjald (MVG)* | 828 | 881 | 999 | 1.141 | 1.225 | |
| *Aðrar inntøkur*** | 618 | 624 | 977 | 1.011 | 1.072 | |
| *Heildarveitingin* | 633 | 631 | 632 | 632 | 633 | |
| ***Inntøkur tilsamans*** | **3.400** | **3.457** | **3.988** | **4.205** | **4.350** | |
| *Rakstur* | 1.939 | 2.016 | 2.110 | 2.283 | 2.553 | |
| *Íløgur* | 228 | 201 | 268 | 292 | 234 | |
| *Lógarbundið* | 1.144 | 1.171 | 1.144 | 1.239 | 1.344 | |
| *Aðrar útreiðslur* | 240 | 280 | 324 | 244 | 202 | |
| ***Útreiðslur tilsamans*** | **3.551** | **3.668** | **3.846** | **4.058** | **4.333** | |
| ***Úrslit*** | **-151** | **-211** | **142** | **147** | **17** | **-570** |

kelda: Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan
* Tølini fyri 2008 og 2009 eru metingar hjá Fíggjarmálaráðnum
** Aðrar inntøkur stava serstakliga frá punktgjøldum, skrásetingargjaldi, felagsskatti og kapitalvinningsskatti

[9] Barsilsskipanin verður stundum søgd at vera ein sosialur grunnur, men hon er á fíggjarlógini, so Búskaparráðið roknar ikki Barsilsskipanina at vera ein grunn.

minni enn undanfarin ár. Inntøkurnar frá MVG fara væntandi bert at vaksa 84 milliónir í 2008. Haraftrat verður mett, at landsskattainntøkan verður tann sama sum í 2007. Útreiðslurnar standa tó ikki í stað, men veksa væntandi við 275 milliónum krónum í 2008. Mett verður tískil, at yvirskotið á fíggjarlógini í 2008 verður 17 milliónir krónur.

Tað er natúrligt, at yvirskotið hjá landinum minkar, tá ið búskaparumstøðurnar vernsa. Áhugavert er tó enn einaferð at ásanna, hvussu skjótt búskapurin kann venda í Føroyum. Í fjør varð mett, at búskapurin fór at kóka yvir, og tí varð róð undir, at búskapurin skuldi tálmast av landsmyndugleikanum.

Hetta varð tíbetur av ongum, tí hóast eingin tálming varð gjørd, bendir nógv á, at hákonjunkturin er við at hæsa av í 2008. Verri lánimøguleikar frá peningastovnum og verri fiskiskapur hava millum annað elvt til broyttu støðuna.

Hevði landsmyndugleikin táttað í í fjør, hevði hann sostatt allarhelst verið konjunkturviðgangandi í ár, og tað hevði møguliga elvt til stóran skaða. Sjálvandi var torført á heysti 2007 at spáa, at búskaparvøksturin fór at minka av sær sjálvum í 2008, men tað vísir okkum bara enn einaferð, at landsmyndugleikarnir skulu als ikki fáast við fíggjarpolitiska neyvstýring av búskapinum, og Búskaparráðið mælti eisini frá hesum í Búskaparfrágreiðingini í fjør.

Fíggjarmálaráðið roknar við einum stórum undirskoti á fíggjarlógini næsta ár. Í slíkum tíðum er eyðsæð, at trýst verður á at minka um raksturin og fremja færri íløgur.

Sjálvsagt er altíð skilagott at hyggja eftir, um raksturin kann gerast ódýrari, men lítið skil er í at skera í rakstrinum bara fyri at minka um undirskotið. Hetta ger bara ringt verri, tí fleiri fólk verða arbeiðsleys.

2.5.2. Kommunurnar

Kommunurnar hava økt munandi um útreiðslurnar tey seinnu árini. Í talvu 6 sæst, at raksturin verður eftir ætlan øktur við 5 prosentum frá 2007 til 2008, meðan íløgurnar økjast við 22 prosentum.

**Talva 6. Ársúrslit hjá kommunum**

| mió. kr. | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008* |
|---|---|---|---|---|---|
| *Skattur* | 1.117 | 1.141 | 1.289 | 1.403 | 1.368 |
| | | | | | |
| *Rakstur* | 783 | 805 | 897 | 993 | 1.044 |
| *Rentur, netto* | 16 | 17 | 11 | 17 | 30 |
| *Íløgur* | 343 | 293 | 381 | 488 | 595 |
| ***Úrslit*** | **-25** | **26** | **0** | **-95** | **-301** |

kelda: Fíggjarmálaráðið
* Tølini fyri 2008 eru úr fíggjarætlanini

### 2.5.3. Sosialu grunnarnir

Sosialu grunnarnir hava seinnu árini havt størri inngjøld enn útreiðslur, tí lønargjaldingarnar eru høgar á arbeiðsmarknaðinum, og arbeiðsloysið er lágt. Góðu tíðirnar hava sostatt økt um ársúrslitini hjá ALS. Í 2007 var ársúrslitið 94 milliónir krónur, meðan metingar fyri 2008 vísa eitt ársúrslit uppá 113 milliónir krónur. Sostatt økir ALS um sína eginogn, sum við árslok 2007 var komin uppá knapt 640 milliónir krónur.

AMEG sparir upp til eitt vaksandi tal av eftirlønarmóttakarum, og tí hava inngjøldini verið høg, meðan útgjøldini ikki eru vaksin í eins stóran mun. Ársúrslitini hjá AMEG hava harvið verið stór tey seinnu árini.

Tilsamans høvdu grunnarnir eitt yvirskot á 102 milliónir krónur í 2007, meðan framrokningin vísir eitt yvirskot uppá 106 milliónir krónur fyri 2008.

**Talva 7. Ársúrlit hjá sosialu grunnunum**

| mió. kr. | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008* |
|---|---|---|---|---|---|
| *ALS* | 3 | 11 | 47 | 94 | 113 |
| *AMEG* | 23 | 42 | 67 | 102 | 106 |
| *Sjúkrakassarnir* | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| ***Tilsamans*** | **26** | **53** | **114** | **196** | **219** |

* tølini fyri 2008 eru framroknað
kelda: ALS, AMEG og Meginfelag Sjúkrakassa Føroya

**Niðurlegging av ALS**

Hugsanin aftanfyri stóru eginognina hjá ALS er at kunna standa ímóti stórum og drúgvum arbeiðsloysi. Búskaparráðið heldur tó, at hetta er ein óneyðug upphópan av peningi, tí til ber at tálma stórum arbeiðsloysi uttan ein stovn sum ALS. Búskaparráðið mælti tískil til fyrr í ár, at lata kapping ráða á arbeiðsloysismarknaðinum, so fólk kundu velja at tryggja seg privat. Har er tó eisini annar møguleiki, um fólk vilja halda á við almennari arbeiðsloysistrygging. Tað er at lata landið hava arbeiðsloysistryggingina um hendið.

Landið kann jú eins væl og ALS rinda arbeiðsloysispengar og móttaka arbeiðsloysisinngjaldið ígjøgnum landsskattin. Einasti munurin er tann, at tá verður ikki neyðugt at savna saman pening í so stórum nøgdum, tí landið hevur jú ongan trupulleika við halli á fíggjarlógini, um arbeiðsloysið er stórt í nøkur ár. Við slíkari umlegging hevði borið til at nýta peningin, ið er í grunninum. Til dømis hevði borið til at lækka uttanlandaskuldina, sum allir føroyingar eru við til at niðurrinda.

Framrokningar vísa sostatt, at almennu myndugleikarnir (landið, kommunurnar og sosialu grunnarnir) fáa eitt samlað hall uppá 652 milliónir krónur í 2008.

2.6. Umheimurin

Viðskifti okkara við umheimin verða gjørd upp í gjaldsjavnanum. Gjaldsjavnin er tvíbýttur, rakstrarviðskifti gjaldsjavnans og kapitalviðskifti gjaldsjavnans. Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans vísir virðið á handli við vørum og tænastum og virðið á peningaflytingum millum Føroyar og umheimin. Hetta verður onkuntíð eisini kallað gjaldsjavnin, tí kapitalviðskifti gjaldsjavnans sipa ikki til annað enn fíggingina av rakstrarviðskiftum gjaldsjavnans. Her verða einans rakstrarviðskifti gjaldsjavnans umrødd, og tí brúka vit heitið gjaldsjavnin í hesum sambandi.

Gjaldsjavnin kann verða býttur í trý: vørujavna, tænastujavna og peningaligar flytingar. Vørujavnin vísir munin á innflutningi og útflutningi av vørum, tænastujavnin vísir munin á innflutningi og útflutningi av tænastum, meðan tær peningaligu flytingarnar vísa inntøkuflytingar og rakstrarflytingar.

Umráðandi er at hava góð tøl fyri øll okkara viðskifti við umheimin, men tíverri er seinasta talið fyri gjaldsjavnan frá 2006, so ikki ber til at meta um føroysk nútíðarviðskifti á hesum øki. Í talvu 8 sæst, at gjaldsjavnin hevur verið positivur nærum øll árini síðani 2000. Tað vil siga, at ognin hjá føroyingum uttanlanda er voksin alsamt. Ein útgreining fyri 2006 vísir, at vørujavnin og tænastujavnin vóru báðir negativir, men hetta varð uppvigað av teimum peningaligu flytingunum, serstakliga lønarflytingum, ognarinntøkum, virðisbrævaavkasti, lánsbrøvum og heildarveitingini.

**Talva 8. Gjaldsjavnin**

| **mió. kr** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Inntøkur* | 6.176 | 6.687 | 6.328 | 5.971 | 5.719 | 6.226 | 6.918 |
| *Útreiðslur* | 5.376 | 5.417 | 5.258 | 6.108 | 4.892 | 6.207 | 6.776 |
| ***Javni*** | **800** | **1.270** | **1.069** | **-137** | **828** | **19** | **142** |

kelda: Hagstova Føroya

Handilsjavnatølini, sum vísa munin á innflutningi og útflutningi av vørum, eru tó nýggj. Talva 9 vísir gongdina í handilsjavnanum við og uttan skip og flogfør. Tað sæst, at meðan hallið í 2005 lutvíst stavaði frá innflutningi av skipum og flogførum, stavaði hallið í 2006-07 frá øðrum innflutningi. Útflutningurin uttan skip og flogfør øktist tó við 136 milliónum krónum í 2007, men innflutningurin øktist við 446 milliónir krónur.

**Talva 9. Handilsjavnin**

| **mió. kr.** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008*** |
|---|---|---|---|---|---|
| Úflutningur uttan skip og flogfør | 3.500 | 3.392 | 3.793 | 3.929 | 3.745 |
| Innflutningur uttan skip og flogfør | 3.584 | 3.713 | 4.560 | 5.006 | 4.862 |
| **Handilsjavni uttan skip og flogfør** | -84 | -322 | -768 | -1.077 | -1.118 |
| Úflutningur við skipum og flogførum | 3.689 | 3.587 | 3.869 | 4.023 | |
| Innflutningur við skipum og flogførum | 3.763 | 4.490 | 4.692 | 5.300 | |
| **Handilsjavni við skipum og flogførum** | -74 | -903 | -823 | -1.277 | |

kelda: Hagstova Føroya
* tølini fyri 2008 eru framroknað

Í 2008 vísir framrokningin, at hallið á handilsjavnanum uttan skip og flogfør verður eisini yvir milliardina. Bæði útflutningurin og innflutningurin tykjast tó at minka í 2008. Tá ið ein samanber 2008 við 2004, sæst, at útflutningurin uttan skip og flogfør er nakað tann sami, meðan innflutningurin er øktur við yvir einari milliard. Ein útgreining av innflutningsgongdini frá 2004 til 2008 vísir, at økingin stendst í høvuðsheitum av øktum innflutningi av brennievni (17 prosent) og innflutningi til beinleiðis nýtslu (8 prosent).

## 2.7. Prísirnir lækka

Útlánskreppan í Sambandsríkinum Amerika er vorðin ein heimsumfatandi fíggjarkreppa. Peningastovnar fara, sum áður nevnt, á heysin ella verða tjóðartiknir, tí teir kunna ikki gjalda verandi skuldarkrøv vegna trot á peningamarknaðinum. Peningastovnar, sum enn eru við í spælinum, eru noyddir at vera afturhaldandi við virkseminum. Hetta gongur út yvir vanligar fyritøkur, tí tær dúva fyri ein stóran part uppá lán frá peningastovnunum at fíggja rakstur og útbyggingar av virksemi. Sostatt minkar møguleikarnir hjá fyritøkuni at veksa, og hetta lækkar búskaparvøksturin um allan

**Mynd 5. Prísur á ráolju og landbúnaðarvørum frá okt. 2006 til okt. 2008***




kelda: Ecowin og Goldman Sachs
* Goldman Sachs framleiðir eitt vísital fyri týdningarmiklar landbúnaðarvørur

knøttin. Lýsta samanspælið millum peningastovnar og fyritøkur ger seg eisini galdandi í Føroyum. Hetta framgongur av minkaðu útlánstølunum til vinnulívið.

Kortini er lægri búskaparvøkstur í heiminum ikki bara ringur fyri Føroyar. Sjálvandi merkir tað allarhelst, at minni eftirspurningur verður eftir føroyskum útflutningi í framtíðini, og at fiskaprísurin lækkar; men útlit eru eisini fyri, at prísurin á innfluttum vørum minkar nógv vegna tann lága eftirspurningin í heiminum. Á myndini sæst til dømis, at prísurin á ráolju og landbúnaðarvørum er minkaður síðani í juli.

Prísfallið á olju og landbúnaðarvørum lættir um hjá teimum føroysku húskunum, tí teirra veruliga inntøka veksur í virði, tá ið prísurin á innfluttum vørum lækkar. Tann fallandi oljuprísurin er eisini ein stórur lætti hjá einum parti av føroyska vinnulívinum.

Føroyar verða sostatt ikki bara negativt ávirkaðar av fíggjarkreppuni, men eisini positivt á summum økjum.

## 3. Fiskivinnan á sjónum

Fiskiskapur er ein sveiggjandi vinna. Orsøkin er, at hon er tengd at faktorum, sum kunnu broytast bæði nógv og skjótt. Til dømis er inntøkan tengd at støddini á teimum alsamt broytiligu fiskastovnunum, meðan útreiðslurnar verða nógv ávirkaðar av oljuprísinum, sum broytist í tráð við tey búskaparligu sveiggini í heiminum.

Mynd 6 vísir samanlagda ársúrslitið hjá lemmatrolarum, partrolarum og línuskipum.  Á myndini sæst, at samlaða úrslitið summi ár broytist við yvir 50 mió. kr. samanborið við árið frammanundan.

Í hesum sambandi skal nevnast, at ógvusligu sveiggini í fiskivinnuni á sjónum er ein av orsøkunum til, at fiskimenn fáa studning frá landinum á hvørjum ári. Tað sær ikki mætari út enn at fólk taka synd í fiskimanninum at fáast við so svikaliga vinnu, og halda tí landið hava skyldu til at traðka til og syrgja fyri, at hann fær minstuløn, tá ið fiskiskapurin svíkir. Hetta er tó skeivur hugburður, ein sonn bjarnartænasta, tí í fyrsta lagi elvir studningurin til, at fleiri fólk arbeiða í fiskivinnuni á sjónum; tað vil siga, at fleiri verða beinleiðis rakt av sveiggjunum, og í øðrum lagi hevði

fiskimaðurin sjálvur syrgt fyri at fáa fasta minstuløn frá arbeiðsgevaranum, um landið ikki veitti hana.  Sigast kann, landið forðar fyri, at fiskimaðurin setur krøv til sítt egna fakfelag,

**Mynd 6. Ársúrslitið hjá lemmatrolarum, partrolarum og línuskipum***




kelda: Rasmussen&Weihe (2003) og Rasmussen&Weihe (2007)
* Tað er ársúrslitið áðrenn óvanligt, sum hugt verður eftir

Fiskimannafelagið, um sømilig arbeiðskor á jøvnum føti við korini hjá arbeiðsmanninum á landi. Eingin náttúrulóg sigur, at fiskimenn ikki kunnu fáa fasta minstuløn frá sínum egna arbeiðsgevara.

Talva 10 sýnir broytingarnar í úrslitinum hjá hvørjum skipabólki fyri seg, og tað sæst, at gongdin hevur verið ymisk. Gongdin kann til dømis vera góð hjá lemmatrolarum, meðan tað gongur av skriðuni til hjá partrolarum og línuskipum.

**Talva 10. Árligar broytingar í ársúrsliti***

| mió. kr. | 1998/99 | 1999/00 | 2000/01 | 2001/02 | 2002/03 | 2003/04 | 2004/05 | 2005/06 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Lemmatrolarar* | -7,6 | 3,3 | -3,8 | 5,2 | -0,1 | -21,4 | 16,1 | -0,4 |
| *Partrolarar* | -7,5 | 5,2 | 33,5 | -23,4 | -59,2 | -5,7 | 22,9 | -0,1 |
| *Línuskip* | -3,1 | -5,8 | 13,6 | -2,3 | 9,0 | -32,4 | -0,1 | -8,3 |

kelda: Rasmussen&Weihe (2003 og 2007)
* Tað er broyting í ársúrsliti áðrenn óvanligt

Hetta bendir á, at skipsbólkarnir verða ójavnt ávirkaðir av stoytum. Áhugavert er at hyggja eitt sindur nærri eftir hesum. Serstakliga er oljuprísurin áhugaverdur, tí broytingar í oljuprísinum eru afturvendandi stoytir á fiskivinnuna á sjónum.

3.1. Viðkvæmisgreining av skipsbólkunum

Við at gera eina viðkvæmisgreining av teimum trimum skipsbólkunum fæst ein mynd av, hvussu ársúrslitið broytist í tráð við broyttar oljuprísir. Nevnast má, at raksturin hjá línuskipinum bregður frá hinum báðum skipasløgunum, og tískil er ikki alneyðugt at hava tey við, men tað kann tykjast forvitnisligt, og tí eru tey við í greiningini.

3.1.1. Bakkast vegna oljuprís

Skipini í teimum trimum skipabólkunum eru ymisk til støddar, og tað sama er galdandi fyri maskinorkuna, men fyri at lætta um lesnaðin verður bert eitt miðaltal roknað út fyri hvønn bólkin. Tað verður, sum áður nevnt, hugt eftir, hvussu úrslitið verður ávirkað av broytingum í oljuprísinum. Inntøkur og útreiðslur, sum ikki hava beinleiðis við fiskiskapin at gera, so sum inntøkur frá atknýttum fyritøkum og virðisbrævainntøkur, eru tiknar burtur úr úrslitinum.

Eitt miðaltal fyri inntøkurnar frá 2001 til 2005 verður roknað út. Eitt slíkt miðaltal verður eisini roknað út fyri útreiðslurnar, har tó oljuútreiðslurnar verða drignar frá. Sostatt ber til at gera viðkvæmisgreining av oljuprísbroytingum í einum miðalári hjá teimum trimum skipsbólkunum.

Hugt verður eftir miðalúrslitunum hjá skipsbólkunum, meðan broytingar verða gjørdar í oljuprísinum. Gjørt verður vart við, at tølini skulu takast við fyrivarni, tí fleiri skip vanta, og, sum áður nevnt, er stórur munur á oljunýtsluni hjá skipum í sama bólki. Eru fleiri av teimum minni orkukrevjandi skipunum ikki við, kann tað hava stóra ávirkan, tí talið av skipum í skipsbólkunum er ikki stórt.

Í talvu 11 sæst, at ein miðallemmatrolari frá 2001 til 2005 hevði fingið eitt negativt úrslit, tá ið oljuprísurin fór upp um 3 krónur fyri 1 litur av gassolju.

**Talva 11. Viðkvæmisgreining av lemmatrolarum**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| A | *Inntøkur, mió. kr.* | 195 | 195 | 195 | 195 | 195 |
| Á | *Útreiðslur, mió. kr.* | 126 | 126 | 126 | 126 | 126 |
| | *Oljunýtsla, mió. l.* | 23,5 | 23,5 | 23,5 | 23,5 | 23,5 |
| | *Oljuprísur, kr./ l.* | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 |
| B | *Oljuútreiðslur* | 24 | 47 | 71 | 94 | 118 |
| A-Á-B | ***Úrslit*** | **46** | **22** | **-1** | **-25** | **-48** |

kelda: Rasmussen&Weihe (2003 og 2007), Umhvørvisstovan (2008) og Jarðfeingi (2008)

Í talvu 12 og 13 sæst, at partrolarar og línuskip høvdu klárað seg við einum oljuprísi yvir 4 krónur, men at báðir bólkar høvdu fingið eitt negativt úrslit, hevði prísurin farið upp um 5 krónur fyri 1 litur av gassolju. Tó verður úrslitið hjá línuskipunum ikki eins negativt og hjá partrolarunum.

**Talva 12. Viðkvæmisgreining av partrolarum**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| A | *Inntøkur, mió. kr.* | 277 | 277 | 277 | 277 | 277 |
| Á | *Útreiðslur, mió. kr.* | 198 | 198 | 198 | 198 | 198 |
| | *Oljunýtsla, mió. l.* | 19,0 | 19,0 | 19,0 | 19,0 | 19,0 |
| | *Oljuprísur, kr./ l.* | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 |
| B | *Oljuútreiðslur* | 19 | 38 | 57 | 76 | 95 |
| A-Á-B | ***Úrslit*** | **60** | **41** | **22** | **3** | **-16** |

kelda: Rasmussen&Weihe (2003 og 2007), Umhvørvisstovan (2008) og Jarðfeingi (2008)

**Talva 13. Viðkvæmisgreining av línuskipum**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| A | *Inntøkur, mió. kr.* | 280 | 280 | 280 | 280 | 280 |
| Á | *Útreiðslur, mió. kr.* | 237 | 237 | 237 | 237 | 237 |
| | *Oljunýtsla, mió. l.* | 9,5 | 9,5 | 9,5 | 9,5 | 9,5 |
| | *Oljuprísur, kr./ l.* | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 |
| B | *Oljuútreiðslur* | 9 | 19 | 28 | 38 | 47 |
| A-Á-B | ***Úrslit*** | **33** | **24** | **14** | **5** | **-4** |

kelda: Rasmussen&Weihe (2003 og 2007), Umhvørvisstovan (2008) og Jarðfeingi (2008

## 3.2. Niðurstøða av viðkvæmisgreiningini

Viðkvæmisgreiningin vísir, at umstøðurnar í vinnuni broytast í tráð við broytingar í oljuprísinum. Til dømis loysir seg best at fiska við línuskipum, tá ið oljuprísurin er høgur, meðan tað loysir seg verst at fiska við lemmatrolarum.

Reiðarar fara sjálvandi ikki at skifta skip, hvørja ferð vinnan fær eitt bakkast. Eisini er ymiskt, hvussu skipasløgini royna seg eftir ávísum fiskasløgum. Men er talan um eitt veruligt bakkast, ið stendur leingi við, eru reiðarar sjálvandi áhugaðir í at leggja um til annan veiðuhátt. Týdningarmikið er tí, at reiðarar – við fyriliti fyri stovnsrøktini – kunnu hava møguleikan at leggja um.

## 3.3. Politiskt ásett veiðubýti

Í Føroyum eru tillagingarmøguleikarnir kortini avmarkaðir. Lógin um vinnuligan fiskiskap ásetur, at partrolarar, sum leggja um til lemmatrol, fáa sum lemmatrolarar tillutað 70 prosent av fiskidøgunum, sum teir høvdu sum partrolarar[10]. Men lógin ger tað ikki møguligt at leggja um hinvegin, hóast tað vildi verið ein rakstrarligur fyrimunur við høgum oljuprísum.

Á hin bógvin er skifti millum trol og línu ikki nakað, ið gerst eftir stuttari tíð, tí rakstrarhættirnir eru sera ymiskir. Men kortini er hugsandi, at tað við tíðini kundi verið flutt í ávísan mun millum hesar bólkar, um lógin gav møguleika fyri tí.

## 3.4. Hví politiskt ásett veiðubýti?

Ein orsøk til politiskt ásetta veiðubýtið er viljin til at verja fiskastovnarnar. Alneyðugt er at verja stovnarnar, tí sjálvt um summi hava hug at mótmæla, at til ber at oyða ein fiskastovn, má ásannast, at verður ein stovnur verður nóg nógv troyttir, fer hann at enda torført við at fóta sær aftur. Politiski myndugleikin hevur tí ábyrgd av at syrgja fyri, at trýstið á fiskastovnarnir er lívfrøðiliga burðardygt.

Búskaparráðið metur tó ikki, at politiskt ásettu skipsbólkarnir eru neyðugir fyri at verja stovnarnar. Satt er, at skipini í teimum ymisku bólkunum ikki eru líka væl egnað til eina og hvørja veiðu; til dømis tekur upsi, sum partrolarnir fiska nógv av, ikki línu. Tó eigur hetta ikki at verða ein forðing hjá reiðarum at leggja um til annan veiðuhátt. Tá ið tað er møguligt at leggja um frá partroli til lemmatrol, eigur eisini at vera gjørligt at hava fleiri umrokningarfaktorar, so til ber at leggja um frá einum og hvørjum skipsbólki til ein annan skipsbólk. Fleiri umrokningarfaktorar, sum taka hædd fyri, hvussu effektiv skipini eru í teimum ymisku skipsbólkunum, mugu tískil fáast til høldar.

[10] Løgtingslóg nr. 28 frá 1994 um vinnuligan fiskiskap, § 29, stk. 8

3.5. Tilmælið hjá Búskaparráðnum

Bakkøst í fiskivinnuni raka skipsbólkarnar ymiskt. Ein høgur oljuprísur rakar lemmatrolarnar meint, meðan partrolarnir klára seg væl betur. Hetta vísir, at um oljuprísurin fer upp á eina hægri príslegu og verður verandi har í framtíðini, so kann møguliga als ikki loysa seg at fiska við lemmatrolarum, meðan partrolarar saktans kunnu loysa. Hetta sást eisini í summar, tá ið oljuprísurin var høgur. Lemmatrolaraflotin lá við bryggju, meðan aðrir skipsbólkar vóru úti og fiskaðu. Samfelagsmissurin var stórur í Suðuroynni, har stórur partur av lemmatrolaraflotanum hoyrir heima.

Búskaparráðið heldur tískil lítið um, at tað er politiskt ásett, hvussu nógv skip skulu vera í hvørjum einstøkum skipsbólki. Lógin eigur at broytast skjótast gjørligt, so hon ikki forðar fyri, at menn kunnu leggja um til annan veiðuhátt. Tað má jú vera vinnan sjálv sum avger, hvussu teir vilja fáa fiskin til høldar.

Tað verður tískil mælt til, at forðingar fyri umlegging verða avtiknar.

Tað verður eisini mælt til, at landið gevst við lønarstudningi til fiskivinnuna. Tað er einki at ivast í, at Fiskimannafelagið kann við samráðingum syrgja fyri, at limirnir fáa eina fasta minstuløn, sum reiðarnir rinda. Ítøkiliga kann yvirgongdin verða framd við, at landið boðar frá í góðari tíð, at frá einum ávísum degi rindar landið ikki longur lønarstuðul. Tá hevur Fiskimannafelagið tíð til at samráða seg fram til eina loysn við Reiðarafelagið, og harvið kemur eingin fiskimaður í knípu.

## 4. Tað almenna

Almennu myndugleikarnir hava trý búskaparlig høvuðsendamál:

- *veita trygging mótvegis váðum*
- *útjavna inntøkur millum fólk og útjavna lívsinntøkuna hjá fólki*
- *betra um marknaðin*

- *veita trygging mótvegis váðum*

Til dømis kann ókeypis sjúkrarøkt og arbeiðsloysisstuðul tulkast sum ein almenn felagstrygging. Hetta tryggjar jú, at fólk, ið verða álvarsliga sjúk ella onga inntøku hava eitt tíðarskeið, fáa hjálp frá restini av samfelagnum ígjøgnum skattakrónurnar.

*- útjavna inntøkur millum fólk og útjavna lívsinntøkuna hjá fólki*

Inntøkurnar hjá fólki eru sera ymiskar, summi hava jú stóra inntøku, og onnur hava lága inntøku. Tað er nógv sum bendir á, at gleðin hjá menniskjanum um eina eyka krónu minkar í mun til mongdina av krónum; við øðrum orðum: gevur tú einum ríkmanni eina krónu, verður hann ikki eins glaður og ein fátækur maður, ið fær eina eyka krónu. Hetta merkir so sjálvandi eisini, at gleðin er størri hjá tí fátæka at fáa eina krónu aftrat, enn sorgin hjá einum ríkum at missa eina krónu. Sostatt kanst tú økja um gleðina í samfelagnum við at flyta nakað frá teimum ríku til tey fátæku. Hetta er tað, sum í roynd og veru verður gjørt við tí progressivu inntøkuskattaskipanini. Nógvir búskaparfrøðingar hava tí eisini ta fatan, at tað er rætt at hava eina progressiva inntøkuskattaskipan, sjálvt um fyrimunir eru við til dømis einari lutfalsskattaskipan.

Fólk við einari lívsinntøku, sum er hægri enn miðal lívsinntøkan í landinum, kunnu eisini hava trupulleikar at klára seg uttan stuðul frá landinum í ávisum løtum í lívinum. Til dømis sum ung lesandi. Tá noyðast tey at dúva uppá, at landið stuðlar. Her kann sigast, at landið útjavnar lívsinntøkuna hjá fólki, tí hesi fólk hava jú nokk av pengum, tá ið tey komin á arbeiðsmarknaðin. Tað skal tó nevnast, at var lánimarknaðurin lýtaleysur, høvdu ung lesandi kunnað klárað seg uttan stuðul frá landinum, tí tey høvdu kunnað lánt frá lánistovnum og so rindað aftur, tá ið tey vóru liðug at lesa og høvdu fingið fast starv. Men lánimarknaðurin er ikki lýtaleysur, tí tað vísir seg, at lánistovnar ikki vilja fíggja lesandi við trygd í teirra framtíðarinntøkum. Orsøkin er, at óvissan um framtíðar inntøkuna er jú rættiliga stór. Tey lesandi kunnu enda uttan arbeiði, tá ið tey eru liðug, ella við einari nógv lægri løn.

*- betra um marknaðin*

Til tíðir og á summum økjum krevst almenn uppíblanding á marknaðinum fyri vørur og tænastur við tí fyri eyga at fáa marknaðin at virka betur. Hetta vegna vantandi kapping og eksternalitetir á marknaðinum.

Marknaðinum tørvar kapping, tá ið ein fyritøka verður einaráðandi í prísásetingini av einari vøru ella tænastu (monopolstøða), ella tá ið fyritøkur innanfyri sama marknað eru fáar (oligopol-støða). Hetta er atvoldin til, at í fleiri londum eru kappingarráð, almennir stovnar, sum hava heimild til at

forða fyri samanleggingum av fyritøkum, um hildið verður, at samanleggingin fer at minka um kappingina á marknaðinum[11]. Hetta er til gagns fyri brúkaran, tí kapping elvir til lægri prísir.

Tá ið skrivað verður eksternalitetir, verður sipað til, at avgerðirnar hjá einum persóni/fyritøku ávirkar onnur óbeinleiðis. Lættast er kanska at greiða frá hesum við dømum.

Skúlabókadømið um eksternalitetir er ein fyritøka, ið dálkar sjógvin, har fiskimenn royna eftir fiski. Við øðrum orðum ávirkar avgerðin hjá fyritøkuni at framleiða fiskimenninar óbeinleiðis, tí sjógvurin verður dálkaður, og hetta minkar um úrtøkuna. Hetta er órættvíst, tí tað er ókeypis at dálka, men missurin hjá fiskimonnunum stórur. Tí krevst ein almenn uppíblanding, sum tillagar dálkingina. Hetta kann til dømis gerast við, at landið ásetur eina dálkingarkvotu, sum bæði fyritøkan og fiskimenninir kunnu keypa. Fiskimenninar hava jú áhuga í at keypa dálkingarkvotuna, tí tað merkir, at sjógvurin ikki verður dálkaður. Fyritøkan hevur sjálvsagt eisini áhuga í at keypa kvotuna, tí uttan hana kann hon ikki framleiða. Landið hevur sostatt skapt ein marknað fyri dálking. Men hvør endar við kvotuni? Jú, eyðsæð er, at hevur fiskurin størri virði enn framleiðslan hjá fyritøkuni, so fara fiskimenninir at keypa dálkingarkvotuna, tí teir hava eitt insitament til at bjóða hægri enn fyritøkan. Og hetta hevði eisini verið best fyri samfelagið, tí fiskurin hevur jú í hesum føri størri virði enn framleiðslan hjá fyritøkuni. Soleiðis kann almenn uppíblanding basa einum eksternaliteti, og harvið betra um marknaðin, so tann mest gevandi vøran verður framleidd.

Dømi frá veruleikanum um, at tað almenna roynir at betra um marknaðin við at minka ávirkanina av eksternaliteti, er eitt nú tá ið flestu av heimsins londum seinnu árini hava gjørt avtalur um at minka koltvísúrnisútlátið. Útlátið elvir jú til, at heimurnin ornar, og hetta ávirkar øll fólk í heiminum. Tí krevst eisini ein altjóða semja, um hvussu ávirkanin av hesum eksternaliteti verður minkað. Til dømis er í hesum sambandi ein marknaður settur á stovn at keypa og selja koltvísúrni í ES.

Eitt annað dømi er, at í Føroyum hava vit avgjøld á søtmeti (bomm, søtar keks…). Ein frágreiðing aftanfyri hesi avgjøld er, at nýtsla av søtmeti hjá fólki er ein eksternalitetur á onnur fólk, tí stórir søtmetisnýtarar eru ein størri byrða fyri heilsuverkið, og harvið verður heilsuverkið tyngri at fíggja. Hetta kann elva til skattahækking, sum øll verða ávirkað av. Sostatt verður restin av fólkunum í samfelagnum óbeinleiðis ávirkað av søtmetisátinum hjá ávísum persónum, tí tey noyðast at rinda

---

[11] Føroyska Kappingarráðið fekk heimild til at forða fyri samanleggingum av fyritøkum tann 1. januar 2008.

meira í skatti. Við at áleggja eitt avgjald á søtmeti slepst undan at hækka skattin á hini í samfelagnum, tí harvið verður tað meir ella minni søtmetisátararnir, sum bera meirkostnaðin.

4.1. Er tað almenna í Føroyum stórt?

Sjálvt um tað stundum kann tykjast sum um, at tað eru politikarar, sum avgera, hvussu stórt tað almenna skal vera, so er hetta ikki rætt. Tað eru íbúgvarnir í landinum, sum í veruleikanum gera av á hvørjum vali, um tad almenna skal minka, veksa ella verða á sama støðið. Íbúgvarnar her á landi hava jú møguleika at fara á løgtingsval, sum verður hildið í minsta lagi fjórða hvørt ár, at velja millum flokkar, sum hava hvør sína hugsjón um, hvussu stórt tað almenna skal vera. Tað kann tí sum so eisini sigast, at als ikki ber til at viðgera, um tad almenna í Føroyum er ov stórt ella ov lítið, tí tað almenna hevur meira ella minni ta støðd, sum íbúgvarnar hava valt. Sostatt ber einans til at gera ta niðurstøðu, tá ið ein samanber almennu støddina í ymiskum londum, at íbúgvarnir í summum londum dáma at hava ein stóran almennan geira, medan íbúgvarnir í øðrum londum dáma ein minni almennan geira.

Á mynd 7 sæst, at íbúgvarnir í Føroyum eru sum heild fegnir um tað almenna, tí tað er einans Svøríki, sum hevði lutfalsliga størri almennar útreiðslur enn Føroyar í 2003. Til dømis hava

**Mynd 7. Samlaðar almennar útreiðslur í prosent av BTÚ, 2003**




kelda: Hagstova Føroya og OECD

Føroyar sjey prosentstig størri almennar útreiðslur enn grannin fyri eystan, Noreg, har tað almenna verður hildið at vera lutfalsliga stórt í mun til mong onnur lond.

Í 2003 fóru 37 prosent av teimum almennu útreiðslunum til lønargjaldingar. Flytingar fyltu 30 prosent av almennu útreiðslunum; flytingar eru millum annað pensjónir, arbeiðsloysistuðul og vinnustuðul. Undir *Annað*, sum fylti 4 prosent, eru rentuútreiðslur, søla og almannaveitingar í feingi[12].

**Talva 15. Almennar útreiðslur, 2003**

| | **mió. kr.** | **lutfall** |
|---|---|---|
| *Lønargjaldingar* | 1.944 | 37% |
| *Flytingar til húsarhald, fyritøkur o.a.* | 1.594 | 30% |
| *Vøru- og tænastukeyp* | 838 | 16% |
| *Íløgur og kapitalflytingar* | 748 | 14% |
| *Annað* | 189 | 4% |
| ***Tilsamans*** | **5.313** | **100%** |

kelda: Hagstova Føroya

Tá ið hugt verður eftir, hvørji endamál almennu útreiðslurnar fara til, sæst, at almannamál er størsta útreiðsluøkið. Har fóru 35 prosent av almennu útreiðslunum í 2003. Tað vóru 1.850 milliónir krónur, ið fóru til almannamál, og av teimum fóru 679 milliónir krónur til ellistænastur og ellisveitingar. Útreiðslurnar til undirvísing vóru 817 milliónir krónur, og har fóru 309 milliónir krónur til for- og fólkaskúla.

**Talva 16. Almennar útreiðslur eftir endamáli, 2003**

| | **mió. kr.** | **lutfall** |
|---|---|---|
| *Aðalfyrisiting* | 465 | 9% |
| *Rættarmál* | 102 | 2% |
| *Vinnumál* | 851 | 16% |
| *Heilsumál* | 774 | 15% |
| *Mentamál* | 124 | 2% |
| *Undirvísingarmál* | 817 | 15% |
| *Almannamál* | 1.850 | 35% |
| *Annað** | 345 | 6% |
| ***Tilsamans*** | **5.328** | **100%** |

kelda: Hagstova Føroya
* *Annað* er m.a. umhvørvis- og íbúðarmál og rentuútreiðslur

[12] Almannaveitingar í feingi eru tænastur, sum tað almenna keypir á marknaðinum at lata húsarhaldum, eitt nú tannlæknatænastur.

4.2. Hvussu verður tað almenna fíggjað?

Semja er millum flest føroyingar, at tað er gott við einum almennum geira, sum veitir ávísar tænastur. Fyri at fíggja tað almenna má fólkið tó lata sær lynda, at partur av teirra peningi verður latin tí almenna. Peningurin verður latin antin beinleiðis, so sum við inntøkuskattinum, ella óbeinleiðis, so sum við avgjøldunum. Haraftrat er Føroyar í tí serstøðu, at eitt annað land, Danmark, sendir á hvørjum ári eitt ávíst tal av krónum til Føroya at fíggja ein part av almennu Føroyum.

Hvussu tað almenna fíggjar sítt virksemi, kann tó broytast á hvørjum ári. Politikarnir kunnu velja at skatta fólki øðrvísi[13], og búskaparstøðan kann eisini broytast. Til dømis gjørdi tann broytta

**Progressivur, lutfalsligur og degressivur skattur**

Progressivur skattur merkir, at ein sum hevur eina stóra inntøku rindar prosentvís meira í skatt av sínari inntøku, enn ein sum hevur eina lítla inntøku. Í Føroyum hava vit ein progressivan inntøkuskatt, og tað er landsskatturin.

Lutfalsligur skattur merkir, at øll rinda tað sama prosentalið í skatti. Til dømis er kommunuskatturin ein lutfalsligur inntøkuskattur.

Eitt hugtak finst eisini, sum eitur degressivur skattur. Degressivur skattur er tað øvugta av progressivum skatti. Tað merkir sostatt, at ein sum hevur eina stóra inntøku, rindar prosentvís minni av sínari inntøku, enn ein sum hevur eina lítla inntøku.

Til dømis er MVG ein degressivur skattur. Orsøkin er, at fólk vid lægri inntøkum brúka lutfalsliga meira av teirra inntøku til keyp av vørum og tænastum. Tað vil siga, at prosentvís fer ein størri partur av inntøkuni hjá minni ríkum til at rinda MVG. Sjálvandi hava ríkari fólk størri nýtslu í krónum av vørum og tænastum, men lutfalsliga, í mun til inntøku teirra, nýta tey minni til keyp av vøru og tænastum.

[13] Tað er tó sjálvandi fólkið, sum velur skattahátt í síðsta enda, tí fólkið velur politikarnar.

búskaparstøðan í  kreppuárinum í byrjanini av nítiárunum tað, at skatturin frá inntøkum hjá fólki lækkaði sera nógv vegna stórt arbeiðsloysi. Skuldi tað almenna ikki verða veruliga skert, máttu inntøkur til tað almenna útvegast á annan hátt. Tískil varð valt at skatta keyp av vørum og tænastum við at leggja 25 prosent oman á prísin, sum so skuldi falla til tað almenna. Hesin skattur fekk navnið meirvirðisgjald (MVG).

Tá ið hugt verður eftir, hvussu inntøkurnar hjá tí almenna eru broyttar seinastu árini, er áhugavert at býta skattainntøkurnar hjá tí almenna í inntøkur, sum stava frá progressivum, lutfalsligum og degressivum skattum.

Í talvu 17 sæst, hvussu tað almenna hevur fíggjað virksemið frá 1998 til 2007. Heildarveitingin frá Danmark er tikin út. Tað sæst, at ongar størri broytingar eru farnar fram í skattainntøkunum hjá tí almenna. Tann progressivi landsskatturin hevur staðið fyri umleið einum triðingi av inntøkunum ígjøgnum alt tíðarskeiðið. Tað sæst tó, at hann hækkaði lutfalsliga fram til 2002 fyri síðani at hava minkað.

**Talva 17. Inntøka hjá tí almenna býtt út á skattasløg**

| | | **1998** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **munur*** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Landsskatturin*** | prog. | 29% | 34% | 35% | 35% | 34% | 33% | 30% | 28% | -1% |
| *Lutfalslig avgj.* | lutf. | 3% | 3% | 2% | 0% | 2% | 1% | 2% | 4% | 0% |
| *Kommunusk.* | lutf. | 26% | 27% | 27% | 28% | 28% | 28% | 27% | 26% | 0% |
| *Sosialir grunnar* | lutf. | 7% | 5% | 5% | 3% | 4% | 5% | 6% | 7% | 0% |
| *Meirvirðisgjaldið* | degr. | 22% | 20% | 20% | 22% | 21% | 22% | 22% | 23% | 1% |
| *Regressiv avgj.* | degr. | 12% | 10% | 10% | 11% | 11% | 11% | 13% | 12% | 1% |
| ***Tilsamans*** | | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | |

kelda: TAKS og Gjaldstova Føroya
* Munurin í prosentstigum frá 2002 til 2007
** Stórur partur av landsskattinum er lutfalsskattur, men tað hevur ikki eydnast at fáa eina uppgerð av hesum parti

Tað er rættiliga undrunarvert, at tann progressivi landsskatturin hevur minkað stútt tey seinastu árini. Orsøkin er, at tá ið uppgongd er í búskapinum, plagar vanliga progressiviteturin at økjast, tí inntøkurnar hækka, og harvið rinda fleiri toppskatt. Hatta er tó ikki hent í uppgongdini frá 2005 til 2007. Hetta stendst av, at samgongan, sum sat frá 2004 til 2008, veitti skattalætta.
Málsøkir eru eisini løgd út til kommunurnar at umsita, og harvið er fíggingin broytt frá progressivum landsskatti til lutfalsligan kommunuskatt.

Tað sæst, at nýtslan hjá húsarhøldunum tey seinastu árini er vaksin, tí inntøkurnar frá avgjøldum eru hækkaðar. Inntøkan frá MVG er til dømis lutfalsliga hækkað við trimum prosentstigum tey seinastu árini. Hetta kemst millum annað av, at rentan hjá evropeiska miðbankanum hevur verið rættiliga lág, og at føroyska peningastovnarnir komu við nýggjum avdráttarfríum lánum á heysti 2005. Hetta økti um tað fíggjarliga rásarúmið hjá húsarhaldunum.

<u>4.3. Kann fíggingin verða frægari?</u>

Tá ið almennu myndugleikarnar skatta fólk, kann hetta elva til atferðarbroytingar. Atferðarbroytingarnar síggjast til dømis aftur í avgerðini hjá fólki at bjóða út arbeiði, at spara saman og gera íløgur[14]. Tá ið inntøkan hjá einum arbeiðsmanni verður skattað, ávirkar skatturin hugin hjá arbeiðsmanninum at bjóða seg fram. Skatturin minkar jú úrtøkuna hjá arbeiðsmanninum av arbeiði, og hetta kann minka um arbeiðsútboðið. Um so er, at arbeiðsmaðurin heldur seg hava alt ov lítið í inntøku aftan á skatt, kann tað enntá enda við, at arbeiðsmaðurin velur heldur at gerast arbeiðsleysur og arbeiða svart. Tað elvir eisini til broytingar í atferðini hjá arbeiðsmanninum, tá ið nýtsla, uppsparing og íløgur verða skattaðar. Avgjøld á ávísar vørur økir prísin á hesum vørum, og hetta minkar um hugin hjá arbeiðsmanninum at keypa vøruna. Skattur av avkastinum av uppsparing og íløgum minkar um úrtøkuna, so hugurin at spara saman ella gera íløgur minkar.

Sostatt kann skattur hava fleiri óhepnar avleiðingar á búskapin, tí avgerðirnar hjá fólki kunnu broytast, soleiðis at eitt nú arbeiðsútboðið verður minni og færri íløgur verða gjørdar. Týdningarmikið er tí av og á at hyggja eftir, um skattaskipanin kann broytast, soleiðis at óhepnu avleiðingarnar av skatti verða minkaðar.

Seinastu mongu árini hava eisini fleiri lond lagt skattaskipanina um fyri at minka um óhepnu avleiðingarnar av skatti. Hetta hevur elvt til niðurskurðir í arbeiðsinntøkuskattinum, har tað almenna so ístaðin hevur fíggjað virksemið við øðrum skattum. Í OECD-londunum er fíggingin av almenna virkseminum frá arbeiðsinntøkuskatti sostatt fallin frá 30 prosent til 25 prosent frá 1985 til 2005 (OECD (2007)). At valt hevur verið at skerja arbeiðsinntøkuskattin stendst, sum áður nevnt, av, at hildið verður, at arbeiðsinntøkuskatturin minkar útboði av arbeiðsmegi.

[14] Avgerðin hjá fólki at arbeiða svart ella ikki at arbeiða svart verður eisini ávirkað.

Tað er tó ikki heilt vist, at lægri skattur á arbeiðið elvir til hægri útboð, tí hædd má verða tikin fyri tveimum ymiskum mótárinum – substitutiónsárinum og inntøkuárinum. Substiónsárin er tað, sum flest fólk hava hoyrt um. Tað plagar at ljóða soleiðis: tá ið arbeiðsinntøkuskattur verður lækkaður, fæst meira burturúr at arbeiða, og tískil substituerar ein frá frítíð til meira arbeiði. Harvið hækkar arbeiðsútboðið við at lækka skattin. Søgan endar tó ikki her, tí vit hava eisini inntøkuárin. Árin, sum flest fólk gloyma. Inntøkuárini sigur: tá ið skatturin á arbeiðsinntøku lækkar, er meira eftir av lønini við tí sama arbeiðstímatalinum. Harvið kann ein halda meira frí og hava ta somu inntøkuna eftir skatt, aftaná at skattalættan er komin. Tískil lækkar arbeiðsútboðið, tá ið skatturin verður lækkaður.

Tað verður tískil altíð ein empiriskur spurningur, tá ið støða skal takast til, um hvussu ein skattalætti ávirkar arbeiðsútboðið í einum landi. Tískil er týdningarmikið at hava góð arbeiðsmarknaðarhagtøl, so tað kann kannast, hvussu skattalætti ávirkar arbeiðsútboðið. Tíverri kunnu vit ikki staðfesta nakað endaligt í Føroyum, sjálvt um samanspælið millum arbeiðsinntøkuskatt og arbeiðsútboð er eitt fyribrigdi, sum fleiri politiskir flokkar hava áhuga fyri. Orsøkin er, at hagtølini eru ikki nóg góð til, at tað verða kannað, hvussu skattalætti ávirkar føroyska arbeiðsútboðið.

Tó vísa fleiri empiriskar kanningar fyri onnur lond, at tá ið arbeiðsinntøkuskatturin lækkar, hækkar arbeiðsútboðið. Kanning hjá Evropeisku Umboðsnevndini av londunum í Evropeiska Samveldinum vísir til dømis, at tá ið umlagt verður frá arbeiðsinntøkuskatti til MVG við einum virði uppá 1 prosent av BTÚ, hækkar arbeiðsútboðið við 0,56 prosentum í miðal eftir tveimum árum (Evropeiska Umboðsnevndin (2006)). Fleiri aðrar kanningar benda á tað sama (sí millum annað (OECD (2006a)), (Nickell (2003)), (Olovsson (2003)), (Davis et al. (2007)), (Daveri et al. (2000)).

Eingin orsøk er at halda, at ávirkanin er øðrvísi í Føroyum. Tvørturímóti kann hugsast, at árinini møguliga eru størri í Føroyum, tí skatturin á arbeiði er lutfalsliga stórur í Føroyum í mun til onnur lond. Hetta átti at elvt til, at arbeiðsútboðið hækkar enn meira enn í londum, har skatturin er lægri[15].

Áhugavert hevði tí verið at hugt eftir, um arbeiðsinntøkuskatturin kann verða lækkaður í Føroyum, uttan at tað verður neyðugt at skerja tað almenna virksemið. Hetta krevur sjálvandi, at okkurt annað verður skattað. Tann skatturin skal sjálvandi hava minni negativa ávirkan á búskapin enn arbeiðsinntøkuskatturin.

[15] Sjálvandi skal hetta takast við varsemi, tí føroyingar seta møguliga størri prís upp á frítíð enn fólk í øðrum londum.

## 4.4. Bústaðarskattur

Ein møguleiki, fyri at minka um arbeiðsinntøkuskattin, er at seta á stovn skatt á egnan bústað.

Bústaðarskattur er skilagóður, og orsøkirnar eru fleiri.

1) Búskaparvøkstur

Bústaðarskattur minkar ikki um arbeiðsútboðið, tí arbeiðslønin verður ikki skattað. Arbeiðsmaðurin fær jú tað sama burturúr einum arbeiðstíma, sjálvt um skatturin á bústaðnum økist. Um tað almenna tískil brúkar sína inntøkuhækking frá bústaðarskatti til at lækka arbeiðsinntøkuskattin, so elvir tað allarhelst til, sum áður nevnt, at arbeiðsútboðið hækkar, samstundis sum tað almenna ikki hevur hækkað tað samlaða skattatrýstið.

Hetta er positivt fyri búskapin, tí tá ið arbeiðsútboðið økist, økist eisini kapitalmongdin í samfelagnum – bæði av humanum kapitali og realkapitali. Humanur kapitalur er vitanin hjá tí einstaka, og vitanin á arbeiðsmarknaðinum gerst jú størri, tess virknari fólk eru á arbeiðsmarknaðinum. Eitt nú um niðurskurðurin í arbeiðsinntøkuskattinum, elvir til at arbeiðsútboðið hjá summum læknum økist, so merkir tað, at teirra vitan er meira á arbeiðsmarknaðinum, og harvið koma sjúklingar undir viðgerð skjótari. Haraftrat økist eisini mongdin av realkapitali, tí tá ið mongdin av fólki á arbeiðsmarkaðinum økist, mugu fleiri maskinur, til dømis teldur og gravkýr, fáast til vega, so hesi fólk fáa arbeitt.

Sostatt elvir lækking av arbeiðsinntøkuskattinum til øking av arbeiðsútboði og kapitali, og harvið økist samlaða framleiðslan í samfelagnum. Økt framleiðsla er tað sama sum búskaparvøkstur.

2) Javnstilling av bústaðareigarum og bústaðarleigarum

Í Føroyum hava vit nærum ongan bústaðarleigumarknað. Hetta kemst í stóran mun av, at landið eggjar fólki at keypa sær ein bústað í staðin fyri at leiga ein bústað. Tað er harmiligt, tí útboð av leigubústøðum hevði elvt til eini meiri smidligan bústaðarmarknað.

Myndugleikarnir kunnu broyta hetta við at seta bústaðarskatt á stovn. Orsøkin til, at bústaðarskattur er neyðugur fyri at javnstilla bústaðareigara og bústaðarleigara, er, at bústaðareigarin hevur eitt skattafrítt eigaraavkast, sum kemst av, at hann ikki hevur leiguútreiðslur. Haraftrat fáa bert bústaðareigarar rentustuðul.

Fyrimunurin verður lýstir við tveimum dømum niðanfyri. Í tí fyrsta døminum hava vit ein persón, sum má lána sær pengar fyri ein bústað, og í tí næsta døminum eigur persónurin nokk av peningi til at keypa sær ein bústað.

Í báðum dømum kostar bústaðurin 1 millión krónur, og árliga rentan er 5 prosent. Persónurin skal velja millum at keypa ella leiga bústaðin á núverandi føroyska bústaðarmarknaði.

Fyrsta dømi

Um hann velur at leiga ein bústað, so hava vit hesa støðu. Vinnuligi útleigarin hevur keypt bústaðin, og hetta kostar honum 50.000 krónur í árligum rentuútreiðslum, tí marknaðarrentan er 5 prosent. Útleigarin hevur ikki rætt til rentustuðul, so hann krevur í minsta lagi 50.000 krónur í leigu frá leigarinum, tí við einari leigu uppá 50.000 krónur hevur hann jú ikki undirskot av virkseminum. Tað merkir, at útreiðslurnar hjá persóninum eru 50.000 krónur.

Um persónurin ístaðin velur at keypa ein bústað, má hann lána 1 millión krónur. Hetta kostar honum 50.000 krónur í rentum, men rentustuðulin frá landinum er 40 prosent av rentuútreiðslunum, so hann rindar bert 30.000 krónur netto í rentum.

Hetta merkir sostatt, at um persónurin keypir, so hevur hann 20.000 krónur minni í útreiðslum, tí hann fær rentustuðul. Hetta eggjar sjálvandi fólki til at keypa í staðin fyri at leiga.

Næsta dømi

Í hesum dømi eigur persónurin 1 millión krónur. Hann velur at leiga ein bústað. Hetta kostar honum, eins og omanfyri, 50.000 krónur í rentum árliga. Pengarnar hjá sær lænir hann út á marknaðinum, og har fær hann 5 prosent í rentu. Tað gevur honum 50.000 krónur, men hann skal

rinda 35 prosent í kapitalvinningsskatti, so hann hevur bert 32.500 krónur eftir. Hetta merkir, at hann manglar 17.500 krónur til leiguna.

Um hann ístaðin keypir bústaðin, hevur hann ongar rentuinntøkur, men hann hevur ei heldur nakra leiguútreiðslu. Tað vil siga, at tað javnvigar. Hann er sostatt betri fyri við at keypa, tí tá ið hann leigaði, manglaði hann 17.500 krónur.

Í næsta dømi kann tað sostatt eisini betur loysa seg hjá persóninum at keypa. Orsøkin er skattafría eigaraavkastið. Varð bústaðarskattur goldin, so hevði persónurin, um hann keypti, rindað 35 prosent av leiguvirðinum á bústaðnum. Í okkara dømi er leiguvirðið 50.000 krónur, tí bústaðurin kostar 1 millión krónur, og rentan er 5 prosent. Persónurin hevði sostatt rindað 17.500 krónur í bústaðarskatti.

Hetta vísir, at bústaðarskatturin hevði javnstillað eigaran og leigaran. Í dømi 1 høvdu eigarin og leigarin næstan verið javnstillaðir. Eigarin hevði verið betri stillaður við 2.500 krónum. Hetta kemst av, at rentustuðulin er 40 prosent, og ikki 35 prosent, sum hann átti at verið fyri at havt javnvág í skatti og stuðli.

Ein bústaðarskattur hevði eisini javnstillað bústaðaríløgur við aðrar íløgur. Tá ið eingin skattur er á eigarabústøðum, merkir tað jú, at íløga í eigarabústað loysir seg betur enn íløgur í fyritøkur, virkir lánsbrøv, virðisbrøv, uppsparing og útleigan av bústøðum, sum alt verður skattað við 35 prosentum.

Tað vil siga, at almenni myndugleikin hevur gjørt av, at tað skal loysa seg betur hjá einum pengamanni at gera eina íløgu í ein eigarabústað enn at keypa til dømis ein part av einari fyritøku.

Hetta er óheppið, tí tað merkir, at íløgan í bústaðir er ov stór í mun til aðrar íløgur. Til dømis kunnu vit hugsa okkum, at ein pengamaður við einari millión krónur skal velja, um hann vil seta peningin í eitt virki ella eina íbúð. Í báðum førum væntar hann eitt árligt avkast uppá 5 prosent. Eyðsæð er, at pengamaðurin velur íbúðina, tí avkastið, av íløgu í egnan bústað, er skattafrítt, meðan avkastið, av íløgu í eitt virki, verður skattað við 35 prosentum.

3) Bústaðarskattur er bert ein skattaumlegging

Í Føroyum búgva tey flestu í egnum bústaði. Tað vil siga, at um bústaðarskattur verður settur á stovn, fara tey flestu at rinda bústaðarskatt. Hetta merkir tó ikki, at tey fara at rinda meira í skatti, tí tað er møguligt at lækka inntøkuskattin samsvarandi. Sostatt verður bert talan um eina skattaumlegging hjá flestu húsarhaldum.

4) Bústaðarhappadrátturin minkar

Tey, sum keyptu ein bústað í Føroyum í 1994, hava fingið virðishækking uppá fleiri hundrað prosent fram til dagin í dag. Hesi fólk hava tískil havt eina eyka inntøku uppá fleiri hundrað túsund krónur, bara tí tey vóru so heppin at koma inn á bústaðarmarknaðin í 1994. Høvdu tey hinvegin komið inn á bústaðarmarknaðin í 1988 og verið noydd at selja í 1994 vegna kreppuna, høvdu tey mist helvtina av bústaðaríløguni. Ein missur uppá fleiri hundrað túsund krónur.

Tað er sostatt sera stórur munur á úrtøkuni hjá fólki á bústaðarmarknaðinum. Haraftrat er rættiliga tilvildarligt, nær fólk koma á og fara av bústaðarmarknaðinum. Fólk keypa sær jú í stóran mun ein bústað, tí tey fáa børn, verða gift, fáa nýtt arbeiði, verða skild ella verða liðug við eina útbúgving, men fara harafturímóti av bústaðarmarknaðinum, tá ið heilsan er farin at bila. Hesir faktorar eru í størsta mun óheftir av sveiggjunum á bústaðarmarknaðinum, og tí kann ein av sonnum kalla bústaðarmarknaðin fyri ein happadrátt.

Tað kann neyvan kallast rættvíst, at summi enda við at vinna fleiri hundrað túsund krónur, meðan onnur líða tap. Har er ikki tað stóra at gera við hetta, men ein bústaðarskattaskipan hevði minkað um órættvísi. Við bústaðarskattinum fara jú tey, sum hava bústað sum hækkar í virði, at rinda meira til landið. Harvið fer ein partur av vinninginum til at fíggja landið, og tað fáa jú øll ágoðan av.

<u>4.5. Hvussu verður bústaðurin skattaður?</u>

Bústaðarskattur verður goldin av tí avkasti, ið bústaðareigari hevur av bústaðinum. Avkastið kemur frá leiguni, sum bústaðareigarin sparir við at eiga sín egna bústað.

Leigan á einum bústaði kann, sum víst omanfyri, verða roknað út við at taka virðið á bústaðnum og falda tað við lánsrentuni á marknaðinum. Einfaldast er at nýta ta somu langtíðarrentuna fyri allar bústaðir. Búskaparráðið hevur valt at nýta rentuna á donskum 10 ára státslánsbrøvum, tí hon minnir um lánsrentuna hjá bústaðarkeyparum; tó er hon sjálvandi nakað lægri, tí váðin við at lána til danska státin er lægri. Rentan hevur seinastu árini ligið á umleið 5 prosentum[16]. Tað merkir, at við at eiga bústað við einum virði uppá 500.000 krónur, sparir tú 25.000 krónur í leiguútreiðslum[17]. Hesin peningur er avkastið hjá bústaðareigaranum, og tískil eigur hesin peningur at verða skattaður við 35 prosentum. Hetta gevur 8.750 krónur.

Tað kann tykjast løgið, at ein bústaðareigari skal rinda skatt av tí, sum hann sparir í leiguútreiðslum, men latið okkum hyggja eftir enn einum dømi.

Ein maður eigur 500.000 krónur. Um maðurin nýtir peningin til at keypa sær ein bústað, hevur hann aftaná keypið, sum áður nevnt, ongar útreiðslur og ongar inntøkur.

Velur maðurin ístaðin at leiga sær ein bústað, kann hann seta tær 500.000 krónirnar á eina bók við einari rentu uppá 5 prosent. Hetta gevur honum 25.000 krónur í rentuinntøku, har hann hevur 16.250 krónur eftir í lummanum, tí kapitalvinningsskatturin er 35 prosent. Leigu skal hann tó rinda. Tann vinnuligi útleigarin hevur gjørt eina íløgu uppá 500.000 krónur at keypa bústaðin. Útleigarin krevur sjálvandi í minsta lagi 5 prosent av sínari íløgu, tí tað kann hann fáa við at bara seta pengarnar á bók. Harvið verður leigan 25.000 krónur. Hetta merkir so, at maðurin manglar 8.750 krónur, um hann velur at leiga[18]. Ein bústaðarskattur hevði sostatt javntstillað møguleikarnar, tí tá hevði eisini bústaðareigarin eisini rindað 8.750 krónur.

<u>4.5.1. Meting av bústaðarvirðinum</u>

Verður ein bústaðarskattaskipan sett á stovn, mugu myndugleikarnir meta um virðið á øllum bústøðum í landinum. Annars ber jú ikki til at rokna leigusparingina. Metingin fer millum annað at byggja á, hvat samlíkir bústaðir verða seldir fyri.

---

[16] kelda: Danmark Statistik
[17] 500.000 kr. * 0,05= 25.000 kr.
[18] Rentuinntøka= 500.000 kr. * 0,05 * 0,35= 16.250 kr. Leiguútreiðslur= 25.000 kr. Úrslit= 16.250 kr. – 25.000 kr.= -<u>8.750 kr.</u>

Roknast má við, at ein árlig virðismeting av øllum bústøðum í landinum fer at tyngja um almennu fyrisitingina. Hetta kann tó verða loyst við at virðismeta við fleiri ára millumbili í staðin fyri at gera eina meting hvørt einasta ár. Tey árini, tá ið virðismeting ikki fer fram, ber til at nýta framskrivingar. Til dømis ber til at framskriva við miðalprísvøkstrinum tey seinastu árini. Framskrivingarskeivleikar kunnu so sjálvandi rættast, tá ið virðismetingin verður gjørd av nýggjum.

4.5.2. Peningatrotstrupulleikar

Ein trupulleiki við bústaðarskatti er peningatrot. Onkur hevur kanska ikki so høga inntøku, men hóast hetta hevur eini stór hús. Bústaðarskatturin kann tískil elva til peningatrot hjá viðkomandi, tí inntøkan røkkur ikki til at rinda bústaðarskattin. Tað kann eisini hugsast, at onkur kann koma illa fyri av peningatroti, tá ið bústaðurin knappliga hækkar nógv í virði.

Har er tó sjálvandi møguleiki at gera ymiskar serskipanir, soleiðis at fólk ikki hava so lætt við at koma í peningatrot. Til dømis kann verða ásett, at bústaðir kunnu í mesta lagi hækka so og so nógv í virði í skattahøpi, so fólk ikki koma illa fyri, um bústaðarvirðið hækkar ov nógv og ov skjótt. Hækkar til dømis ein bústaður við 20 prosentum eftir einum ári, kann henda hækkanin verða spjadd yvir fleiri ár.

Haraftrat kann serskipan verða gjørd, har bústaðarskattur ikki verður goldin, tá ið ein gerst pensjónistur. Tá fellur jú inntøkan munandi, meðan bústaðarvirðið er tað sama. Í staðin fyri kann verða borið so í bandi, at pensjónistar skylda bústaðarskattin, sum teir ikki rinda, meðan teir eru pensjónistar. Bústaðarskatturin fellur harvið fyrst til landið, tá ið bústaðurin verður seldur. Tá verður skuldin hjá pensjónistinum drigin frá søluupphæddini av bústaðnum, og landið fær sín pening. Leggjast kann aftrat, at verður bústaðurin ikki seldur, men fellur í staðin í arv, kann móttakarin av útlutingini setast í skattligu støðuna hjá tí deyða. Sostatt fylgir skuldin bústaðnum. Arvingin kann sjálvandi altíð rinda skuldina beinavegin, tí møguligt er at selja bústaðin ella taka lán í bústaðnum.

4.6. Hvør er inntøkan av bústaðarskatti?

Tá ið mett verður um samlaða bústaðarvirðið í Føroyum, kunnu søluprísirnir fyri sethús, sum Eik Banki útgevur hvønn ársfjórðing, nýtast til eina varisliga meting av bústaðarvirðinum. Íbúðarsølur eru ikki við í hagtølunum hjá Eik, men tað bilar ikki, tí nógv flestu bústaðir í Føroyum eru sethús.

Hugt verður eftir bústaðarvirðinum í 2007. Útrokningar kunnu síggjast í fylgiskjali 1.

Samlaða bústaðarvirðið var umleið 28.000 milliónir krónur í 2007. Við einari rentu uppá 5 prosent og einum kapitalvinningsskatti uppá 35 prosent fáa vit upphæddina fyri leigusparingina. Hon er:

28.000 milliónir krónur * 0,05 * 0,35 = 490 milliónir krónur

Hevði bústaðarskattur verið innførdur, hevði sostatt verið møguligt at lækka inntøkuskattin við 490 milliónum krónum, uttan at inntøkurnar hjá tí almenna minkaðu. Sambært tølum hava vit 17.699 húskir í Føroyum[19]. Hetta merkir sostatt eina mánaðarliga lækking í inntøkuskattinum uppá 2.300 krónur fyri hvørt húski.

Ein slík lækkan í inntøkuskattinum hevði møguliga eggjað fólki at arbeiða meira, og harvið hevði framleiðslan í samfelagnum vaksið.

4.7. Niðurstøða

Til ber at leggja skattaskipanina um og minka um keðiligu avleiðingarnar av skatti uttan niðurskurð í almenna geiranum. Hetta er gjørligt við umlegging frá arbeiðsinntøkuskatti til bústaðarskatt, tí lækking av arbeiðsinntøkuskattinum økir allarhelst arbeiðsútboðið. Haraftrat vil umleggingin ikki venda sosialt skeivt, tí vælhavandi fólk koma at rinda mest í bústaðarskatti, tí teirra bústaðir hava størst virði.

Hjá húsarhaldunum snýr tað seg bert um, at skattatrýstið lutvíst verður flutt yvir til eina bústaðarskattaskipan. Peningaliga er eingin munur. Sjálvandi finnast einstøk húsarhøld sum hava stóran bústað ímun til inntøkuna. Onkur teirra kann tí møguliga koma illa fyri í skattaumleggingini, men hetta er bert ein fyribils trupulleiki, tí møguligt er at finna ein nýggjan og betur hóskandi bústað. Hetta er sjálvandi keðiligt, men eigur slíkt ikki at forða einari skilagóðari skattaumlegging, sum tænir landinum.

[19] kelda: Postverk Føroya

Búskaparráðið hevur víst á stórar fyrimunir við bústaðarskatti. Bústaðarskattur hevur tó eisini sínar vansar. Vansarnir eiga tó at kunna loysast við serskipanum fyri ávísar samfelagsbólkar, til dømis pensjónistar.

Tað skal nevnast aftur, at verður bústaðarskattur settur á stovn, eigur galdandi rentustuðulsskipan at verða broytt, soleiðis at stuðulsprosentið verður lækkað frá núverandi 40 prosentum niður á 35 prosent. Verður ein bústaðarskattaskipan ikki sett á stovn, er tó ongin meining í at hava rentustuðul, so tá standa gomlu boðini hjá Búskaparráðnum við, um at rentustuðlaskipanin skal avtakast.

## 5. Bókmentaskrá


Barr, Nicholas , *"Economics of the Welfare"* , Oxford University Press 4. ed. , 2004

Barr, Nicholas , *"Economic Theory and the Welfare State: A Survey and Interpretation"* , Journal of Economic Literature Vol. 30 No. 2 , 1992

Bernheim, Douglas, Andrei Shleifer og Lawrence H. Summers , *"The Strategic Bequest Motive"* , Journal of Political Economy 93 No. 6 , 1985

Boskin, Michael J. , *"Estate Taxation and Charitable Bequests"* , Journal of Public Economics 5 , 1976

Cnossen, Sijbren , *"Taxing Capital Income in the European Union"* , Oxford University Press , 2000

Daveri, Francesco and Guido Tabellini , *"Unemployment, Growth and Taxation in Industrial Countries"* , Economic Policy Volume 15 , 2000

Davis, Steven J. og Magnus Henrekson , *"Economic Performance and Work Activity in Sweden After the Crisis of the Early 1990s"* , University of Chicago , 2007

Davis, Steven J. og Magnus Henrekson , "Tax Effects on Work Activity, Industry Mix and Shadow Economy Size: Evidence from Rich-Country Comparisons" , University of Chicago , 2004

Eik Banki, *"Fullfíggjað yvirlit yvir sethúsaprísir 1985-2008"* , Eik Banki , 2008

Evropeiska Umboðsnevndin , *"Macroconomic effects of a shift from direct to indirect taxation: A simulation for 15 EU member states "* , Evropeiska Umboðsnevndin , 2006

Feldstein, Martin , *"The Effect of Marginal Tax Rates on Taxable Income: A Panel Study of the 1986 Tax Reform Act"* , NBER Working Paper No. 4496 , 1997

Gale, William G. og Maria G. Perozek , *"Do Estate Taxes Reduce Saving?"* , The Brookings Institute , 2001

George, Henry , *"Progress and Poverty"* , Cosimo (2005)
Pedersen, Erik Haller , *"Kapitalgevinsbeskatning af ejerboliger"* , Samfundsøkonomen 5 , 2004

Holm, Dennis og Bogi Mortensen , *"Nøgdir og nýbrot"* , Sprotin , 2008

Joulfaian, David , *"Choosing between Gifts and Bequests: How Taxes Affect the Timing of Wealth Transfers"* , Journal of Public Economics 89 , 2005

Koskela, Erkki , *"Labour taxation and employment in trade union models: A Partial Survey"* , Bank of Finland , 2001

McGarry, Kathleen , *"Behavioral Responses to the Estate Tax: inter vivos giving"* , National Tax Journal 53 , 2000

Mendoza, Enrique, Assaf Razin og Linda Tesar , *"Effective Tax Rates in Macroeconomics: Cross-country Estimates of Tax Rates on Factor Incomes and Consumption"* , Journal of Monetary Economics Vol. 34 No. 3 , 1994

Nickell, Stephen , *"Employment and Taxes"* , Venice Summer Institute, 2003

OECD , *"Fundamental Reform of Personal Income Tax"* , OECD , 2006

OECD , *"Revenure Statistics 1965-2006"* , OECD , 2007

Olovsson, Conny , "Why Do Europeons Work So Little?" , Stockholm University , 2003

Planas, Cristophe, Werner Roeger og Alessandro Rossi , *"How Much has Labour Taxation contributed to European Structural Unemployment?"* , European Commission , 2003

Postverk Føroya , *"Tal av húskjum í Føroyum"* ,  Postverk Føroya , 2008

Rasmussen&Weihe , *"Roknskapargreining av fiskiflotanum 1998 til 2002"* , Rasmussen&Weihe , 2003

Rasmussen&Weihe , *"Roknskapargreining av fiskiflotanum 2002 til 2006"* , Rasmussen&Weihe , 2007

Samtak , *"Sáttmálar hjá FA"* , Samtak , 2008

## 6. Fylgiskjal

### 6.1. Fylgiskjal 1: Útrokning av bústaðarskattinum í 2007

Samlaða bústaðarvirðið í 2007

Miðalhandilsprísir í smærri bygdum: 1.049.157 krónur

Tal av handlum í smærri bygdum: 85

Miðalhandilsprísir í størri bygdum: 1.232.039 krónur

Tal av handlum í størri bygdum: 103

Miðalhandilsprísir í Tórshavn: 2.309.648 krónur

Tal av handlum í Tórshavn: 112

Miðalhandilsprísur fyri Føroyar í 2007 =

(1.049.157 krónur * 85 + 1.232.039 krónur * 103 + 2.309.648 krónur * 112) / (85 + 103 + 112) = 1.582.530 krónur

Talið av húskjum í Føroyum er 17.699. Sostatt er samlaða bústaðarvirðið:

1.582.530 krónur * 17.699 = 28.009.198.470 krónur